LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# Ársfrágreiðingin

## 2025



LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

*Løgtingsins umboðsmaður*
**Ársfrágreiðingin 2025**
© 2026 Løgtingsins umboðsmaður
Uppseting: Sendistovan
Prentumsiting: Sendistovan
Myndir: Faroephoto v/Ólavi Frederikssen

ISBN 978-99918-891-5-3

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit


*1)* Um embætið .......... **8**

*2)* Gongdin í 2025 .......... **10**

*3)* Hagtøl .......... **15**

*4)* Álit .......... **29**

*5)* Frágreiðingar .......... **53**

*6)* Avvístar klagur .......... **65**

*7)* Onnur viðgerð og hjálp til borgarar .......... **74**

*8)* Greinar:
Barnarættindasáttmálin og lógarfyrireiking .......... **82**

Vandi fyri mismuni í sambandi við
talgilding av tænastum .......... **86**

*9)* Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000
um Løgtingsins umboðsmann .......... **89**

*10)* Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur
og kanningar í 2025, har álit og skriv vórðu
almannakunngjørd .......... **93**



# Til Løgtingið

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2025.

Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2026.

Tórshavn, mai 2026



*Hanna Vang*
*Løgtingsins umboðsmaður*

# 1 Um embætið



Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5 - ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 10. september 2025 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg aftur til løgtingsins umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 1. januar 2026. Umframt meg sjálva er embætið mannað við løgfrøðingunum Gurið Joensen, Heina Petersen, Mary Kirstenardóttir Cazabon umframt Fríðu S. Berg, skrivstovuleiðara.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í

seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er:
**Løgtingsins umboðsmaður**
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
Teldupostadressa: **lum@lum.fo**
Heimasíða: **www.lum.fo**

**Barnanna umboðsmaður**
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
Teldupostadressa: **bum@bum.fo**
Heimasíða: **www.bum.fo**

# 2 Gongdin í 2025

## Innkomin og avgreidd mál í 2025

Í ársfrágreiðingini eru frásagnir av ymiskum málum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt í 2025. Álit, skriv og frágreiðingar liggja í síni fullu longd í savninum á heimasíðuni. Í 2025 fekk umboðsmaðurin 104 klagur. Av hesum vórðu 93 endaliga avgreiddar innan 31. desember. Harumframt vórðu avgreiddar 23 klagur frá undanfarnum árum. Talið av klagum var eitt sindur lægri enn í 2024, men eitt sindur hægri enn árini 2021-2023. Størsta talið av innkomnum klagum í 2025 var á málsøkinum “Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál”, men beint undir var málsøkið “Børn og ung”. Býtið av málum millum málsøkir sæst í talvu 2. Av teimum 116 klagunum, sum vórðu avgreiddar í 2025, endaðu 26 við niðurstøðum í antin áliti ella skrivi. 71 klagur vórðu avgreiddar við aðrari viðgerð enn niðurstøðu frá umboðsmanninum, meðan 19 klagur vórðu avvístar uttan viðgerð. Í 2025 vórðu givnar átalur í 15 niðurstøðum.

## Mál av egnum ávum

Í 2025 almannakunngjørdi umboðsmaðurin tvær eftirlitsvitjanir og eina kanning:

- Vitjan á Gerðisgarði (mál nr. 24/21799)
- Skúlin á Trøðni (mál nr. 25/07621)
- Kanning av framferðini hjá Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í nýtslu í apríl 2025

Frágreiðingar frá hesum trimum málunum eru at finna í einum kapitli fyri seg.

## Fyrispurningar

Umframt móttiknar klagur fær umboðsmaðurin hvørt ár munnligar og skrivligar fyrispurningar. Í 2025 fekk umboðsmaðurin 95 fyrispurningar, sum snúðu seg um sera ymisk evnir. Felags fyri allar fyrispurningarnir var, at borgararnir sótu við spurningum um sína rættarstøðu, og hvar teir kundu venda sær fyri at finna svar. Spurningar vóru eitt nú um pensjónsviðurskifti, barnaverndarmál, byggimál og innlitsmál.
Umboðsmaðurin vegleiðir, um klaga kann sendast til umboðsmannin. Um málini ikki eru endaliga viðgjørd innan fyrisitingina, verður borgarin vístur til at nýta kærumøguleikan. Um tørvur er á løgfrøðiligari ráðgeving verður víst til Rættarhjálp Føroya.

## Greinar

**Vandi fyri mismuni í sambandi við talgilding av tænastum**
Við støði í álitinum um framferðina hjá Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í nýtslu fyri Suðuroyarleiðina í apríl 2025, hevur umboðsmaðurin valt at skriva nakrar reglur um vandan fyri mismuni í sambandi við talgilding av almennum tænastum.
Neyðugt er, at krøv til borgarar um talgilda luttøku sum treyt fyri at móttaka javnbjóðis tænastur, eru væl umhugsað. Um ansað ikki verður eftir, kann skjótt gerast talan um mismun á borgarum vegna talgildar førleikar.

**Barnarættindasáttmálin og lógarsmíð**
Umboðsmaðurin er av Føroya Løgtingi biðin um at hava eitt serligt eftirlit við, at Barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin, og gera Løgtingið og Landsstýrið varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við Barnarættindasáttmálan. Hóast lógarfyrireiking ikki er beinleiðis fyrisitingarligt virksemi, er tó talan um týðandi tátt í starvi Føroya at liva upp til Barnarættindasáttmálan.
Í ársfrágreiðingini í ár hugleiðir umboðsmaðurin um, hvussu skyldur Føroya sambært Barnarættindasáttmálanum kunnu síggjast sum natúrligur partur av lógarfyrireiking.

## Skeið og luttøka í tiltøkum

Umboðsmaðurin leggur seg eftir at luttaka á fundum við samstarvsfelagar í norðurlendskum og altjóða høpi. Eisini vil umboðsmaðurin fegin vera við til tiltøk, har høvi er at kunna um Barnarættindasáttmálan og klagumøguleikan til umboðsmannin.

**Barnaráðstevna í Norðurlandahúsinum**
Barnaráðstevna varð hildin í Norðurlandahúsinum í døgunum 21. til 23. januar 2025. Ráðstevnan var eitt samstarv millum Barnaverkætlanina, Undirvísingarstýrið, Nám, Barnabata og Norðurlandahúsið.
Umboðsmaðurin fekk høvi at hava eitt stutt upplegg fyri børnunum tann eina dagin og tosaði tá um, hvussu tað er í samsvar við Barnarættindasáttmálan, at børn koma til orðanna, bæði sum einstaklingar og eisini sum bólkur.

**Mannarættindaráðstevna í Aalborg**
Í døgunum 22. og 23. januar 2025 var ein ráðgevi á mannarættindaráðstevnu í Aalborg. Fyrilestrar vóru um viðkomandi evnir innan mannarættindi og nationalan rætt, eitt nú barnalóg, og hvussu Hægstiræттur hevur tulkað frælsisrættindini í grundlógini síðstu 175 árini.

**Norðurlendskur barnaumboðsmannafundur í Keypmannahavn**
Løgtingsins umboðsmaður luttekur í einum netverkið við norðurlendskar barnaumboðsmenn, sum hittast árliga og sum eisini luta royndir og vitan sína gjøgnum

árið. Hóast hinir limirnir í netverkinum hava annarleiðis og lutvíst víðari heimild enn Løgtingsins umboðsmaður á barnaøkinum, metir umboðsmaðurin netverkið vera virðismikið íkast til at fáa innlit í barnaøkið í norðurlondum.

Tann 28. og 29. apríl 2025 var umboðsmaðurin saman við einum ráðgeva til ársins fund í Keypmannahavn. Vertur var Børnerådet. Vit fingu høvi at vitja Joannahuset, sum er ein ráðgevingar og kreppumiðstøð, har børn og ung undir 18 ár kunnu venda sær alt døgnið. Harumframt greiddu tey ymisku londini frá, hvørjum tey arbeiða við, og hvørjar avbjóðingar tey síggja.

**Ráðstevna í Helsinki – frágreiðing um barnarættindi undir Covid**
Nordisk velferdssenter bjóðaði í sambandi við eina covid-eftirmeting norðurlendska netverkinum av barnaumboðum at vera við í eini frágreiðing. Frágreiðingin varð útgivin av Nordisk Velferdssenter í samstarvi við professor Emerita Kirsten Sandberg og norðurlendsk barnaumboð. Heiti á frágreiðingini er "Participation is protection – embedding children's rights in Nordic crisis governance". Løgtingsins umboðsmaður lat í hesum sambandi stutt íkast til frágreiðingina við støði í eftirmetingini hjá Føroya Landsstýri av, hvussu Føroyar stýrdu gjøgnum Covid.
Í sambandi við fyrireiking av frágreiðingini varð hildin ráðstevna í Helsinki tann 4. og 5. juni 2025 við yvirskriftini "The right of children and young people to be heard, seen and involved in the nordic region". Umboðsmaðurin luttók í einum pallborði, eins og Barnabati luttók við umboðum fyri ung í Føroyum.

**Fyrisitingarligur fundur millum norðurlendskar umboðsmansstovnar**
Løgtingsins umboðsmaður hevur í fleiri ár luttikið í regluligum fundum annaðhvørt ár, millum fyrisitingarnar hjá norðurlendsku umboðsmansstovnunum. Endamálið við fundunum er at byggja sambond og luta virðismiklar royndir í, hvussu arbeiðið kann skipast.
Í døgunum 18. til 21. august 2025 luttók ein ráðgevi á slíkum fundi í Nuuk, sum umboðsmaðurin fyri Inatsisartut var vertur fyri. Føroyski ráðgevin hevði saman við grønlendskum ráðgeva framløgu um gegnisavbjóðingar í lítlum samfeløgum.

**Skúlavitjanir**
Umboðsmaðurin vitjar fegin skúlar og onnur støð, har børn eru, fyri at kunna um Barnarættindasáttmálan og sítt virksemi. Á slíkari vitjan royna vit at geva ítøkiliga og barnavinarliga kunning um Barnarættindasáttmálan, barnarættindi og møguleikan hjá børnum at venda sær til umboðsmannin.

Í 2025 vitjaði umboðsmaðurin Leirvíkar Skúla og Velbastaðar skúla.

**Umboðsmenn í danska ríkinum hittust**
Stig vórðu í 2025 tikin til at styrkja sambandi millum umboðsmansstovnarnar í ríkinum. Eftir skrivligt samskifti og netfund varð avgjørt at hittast í Keypmannahavn, tann 21. oktober. Á fundinum luttóku umboðsmenninir við ráðgevum. Vit umrøddu

millum annað førleikamennning fyri starvsfólk, møguleika hjá starvsfólkum fyri styttri arbeiðsuppihaldum hjá hvørjum øðrum, eins og samstarv og lutan av vitan innan eftirlitsvirksemið. Avtalað varð, at umboðsmenninir í ríkinum fara at hava regluligt samband og fara at leggja seg eftir at luta mannagongdir og vitan innan umboðsmansvirksemið sína millum í størri mun.

### Evropeiskur umboðsmannafundur í Brússel

Løgtingsins umboðsmaður fekk innbjóðing at luttaka í árliga fundinum hjá evropeisku umboðsmonnunum, sum verður hildin av ES-umboðsmansstovninum. Fundurin varð hildin 20. og 21. november 2025 í Brussel. Løgtingsins umboðsmaður valdi at luttaka saman við ráðgeva, av tí at evnini á skrá vóru viðkomandi. Umboðsmenn lutaðu eitt nú royndir og vitan innan viðgerð av klagum á umhvørvisøkinum. Tosað varð eisini um, í hvønn mun umboðsmenn fáa framt eftirlit við almennum fyrisitingaruppgávum, sum verða lagdar til stovnar og eindir, sum liggja heilt ella lutvíst uttan fyri almennu fyrisitingina.



# 3 Hagtøl

| | |
|---|---|
| Talva 1–3 | Innkomnar klagur í 2025 |
| Talva 4–7 | Klagur, sum blivu lidnar í 2025 |
| Talva 8 | Mál av egnum ávum |
| Talva 9–13 | Málsviðgerðartíðin av málum, sum blivu liðug í 2025 |
| Mynd 1–6 | Sammetingar við undanfarin ár |

# Innkomnar klagur í 2025 býttar á myndugleikar

Í 2025 komu inn 115 klagur.
Hesar klagur vóru býttar soleiðis millum ymisku myndugleikarnar:

Talva 1

| Myndugleiki | Klagur |
|---|---|
| Akstovan | 2 |
| Almanna- og mentamálaráðið | 4 |
| Almannaverkið | 7 |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 12 |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 2 |
| Barnaverndartænastur | 2 |
| Bú- og heimatænastan í Suðuroy | 1 |
| Búnaðarstovan | 1 |
| Búskaparráðið | 1 |
| Familjufyrisitingin | 1 |
| Fíggjarmálaráðið | 3 |
| Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið | 1 |
| Fuglafjarðar kommuna | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 8 |
| Føroya Landsstýri | 1 |
| Heilsumálaráðið | 1 |
| Heilsutrygd | 1 |
| Klaksvíkar kommuna | 2 |
| Kvívíkar kommuna | 1 |
| Landsapotekarin | 1 |
| Landsbankin | 2 |
| Landssjúkrahúsið | 2 |
| Løgmálaráðið | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 3 |
| Posta | 1 |
| Runavíkar kommuna | 7 |
| Sernám | 1 |
| Sjúkrahúsverkið | 1 |
| Skúlin á Trøðni | 1 |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 1 |
| Strandfaraskip landsins | 2 |
| Suðuroyar sjúkrahús | 1 |
| Sumbiar kommuna | 1 |
| Sunda kommuna | 2 |
| Sørvágs kommuna | 2 |
| Taks | 2 |
| Tórshavnar kommuna | 6 |
| Umhvørvismálaráðið | 1 |
| Umhvørvisstovan | 3 |
| Undirvísingarstýrið | 1 |
| Útlendingastovan | 1 |
| Vága kommuna | 3 |
| Vestmanna kommuna | 1 |
| Annað | 1 |
| **Tilsamans** | **104** |

# Innkomnar klagur í 2025 býttar á málsøki

Talva 2

| Málsøki | Tal av klagum |
|---|---|
| Almanna-, familju og heilsumál | 16 |
| Børn og ung | 20 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 3 |
| Fólkayvirlit og nøvn | 1 |
| Kommunumál | 11 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 3 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 11 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 23 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 11 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 1 |
| Uttanríkis- og verjumál | 1 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 1 |
| Annað | 2 |

# Innkomnar klagur í 2025 býttar á evni

Talva 3

| Evni | Tal |
|---|---:|
| Avgerð | 34 |
| Vantandi avgerð | 2 |
| Atburð | 1 |
| Gegni | 1 |
| Innlit | 9 |
| Málsviðgerðartíð | 14 |
| Notatskylda og journalisering | 2 |
| Partshoyring | 1 |
| Tagnarskylda og viðgerð av persónsupplýsingum | 2 |
| Útinnandi fyrisiting | 17 |
| Vantandi svar | 14 |
| Aðrir málsviðgerðarspurningar | 7 |

# Endaliga avgreiddar klagur í 2025

Av teimum 104 klagunum, sum komu inn í 2025, vóru 93 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2025. Harumframt vóru avgreiddar 23 klagur frá undanfarnum árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

Talva 4

| Klagur býttar á myndugleika | | Endaðar við | | |
|---|---|---|---|---|
| **Myndugleiki** | **Klagur** | **Avvístar** | **Onnur viðgerð** | **Viðgjørdar við áliti ella skrivi** |
| Akstovan | 2 | 1 | 1 | |
| Almanna- og mentamálaráðið | 4 | 1 | 1 | 2 |
| Almannaverkið | 5 | 1 | 3 | 1 |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 13 | | 7 | 6 |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 2 | | 2 | |
| Barnaverndartænastur | 9 | 1 | 8 | |
| Bú- og heimatænastan í Suðuroy | 1 | | 1 | |
| Búnaðarstovan | 2 | | 1 | 1 |
| Búskaparráðið | 1 | | 1 | |
| Eiðis kommuna | 1 | | | 1 |
| Eysturskúlin | 1 | | 1 | |
| Familjufyrisitingin | 1 | 1 | | |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | | | 2 |
| Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið | 3 | | 1 | 2 |
| Fuglafjarðar kommuna | 1 | | | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 7 | 2 | 5 | |
| Føroya Landsstýri | 1 | 1 | | |
| Heilsumálaráðið | 1 | | 1 | |
| Heilsutrygd | 1 | | 1 | |
| Klaksvíkar kommuna | 1 | | 1 | |
| Kvívíkar kommuna | 1 | | 1 | |
| Landsbankin | 2 | | 2 | |
| Landssjúkrahúsið | 2 | 2 | | |
| Landsverk | 1 | | | 1 |
| Løgmálaráðið | 1 | | | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 4 | | 3 | 1 |
| Posta | 1 | 1 | | |
| Runavíkar kommuna | 8 | 1 | 7 | |
| Sernám | 2 | 1 | 1 | |
| Sjúkrahúsverkið | 1 | | 1 | |
| Skúlin á Trøðni | 1 | | 1 | |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 1 | | 1 | |
| Strandfaraskip landsins | 2 | 2 | | |
| Suðuroyar sjúkrahús | 1 | 1 | | |
| Sumbiar kommuna | 1 | | | 1 |
| Sunda kommuna | 3 | | 2 | 1 |
| Sørvágs kommuna | 2 | 1 | 1 | |
| Taks | 3 | 1 | 1 | 1 |
| Tórshavnar kommuna | 7 | | 6 | 1 |
| Umhvørvismálaráðið | 1 | | 1 | |
| Umhvørvisstovan | 4 | | 2 | 2 |
| Undirvísingarstýrið | 1 | | 1 | |
| Útlendingastovan | 1 | | 1 | |
| Uttanríkis- og Vinnumálaráðið | 1 | | | 1 |
| Vága kommuna | 2 | | 2 | |
| Vágs kommuna | 1 | | 1 | |
| Vestmanna kommuna | 1 | | 1 | |
| Annað | 1 | 1 | | |
| **Tilsamans** | **116** | **19** | **71** | **26** |

## Viðgjørdar klagur í 2025 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar, ella har grundarlag ikki var fyri at kanna málið

Í 2025 vóru viðgjørdar 71 klagur, har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar, ella har grundarlag ikki var fyri at kanna málið.
Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 5

| Onnur viðgerð og hjálp | Klagur |
|---|---|
| Gongd komin á málið | 7 |
| Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið | 46 |
| Klagari vístur til kærumyndugleika | 7 |
| Málið tikið uppaftur | 3 |
| Annað | 8 |

## Avvístar klagur í 2025

Í 2025 vóru 19 klagur avvístar av ymiskum orsøkum.
Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 6

| Avvísingarorsøk | Klagur |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 5 |
| Kærumyndugleiki ikki troyttur | 10 |
| Uttanfyri heimildarøki | 4 |

## Viðgjørdar klagur í 2025 býttar á málsøki

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2025, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

Talva 7

| Málsøki | Klagur |
|---|---:|
| Almanna-, familju og heilsumál | 8 |
| Børn og ung | 20 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 4 |
| Fólkayvirlit og nøvn | 1 |
| Kommunumál | 12 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 8 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 7 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 21 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 9 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 3 |
| Uttanríkis- og verjumál | 1 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 3 |

## Mál tikin upp av egnum ávum - eftirlitsvitjanir og kanningar

Av teimum 3 málunum, sum umboðsmaðurin sjálvur tók upp í 2025, vóru 2 endaliga avgreidd innan 31. desember 2025. Harumframt var avgreidd 1 mál frá undanfarnum árum. Frágreiðingarnar kunnu lesast frá síðu 53.

Talva 8

| Avgreiddu málini eru býtt soleiðis millum ymisku myndugleikarnar | | |
|---|---|---|
| **Byrjað** | **Heiti á máli** | **Myndugleiki** |
| 2024 | Eftirlitsvitjan á eldraøkinum/bústøðum fyri fólk við demens (Gerðisgarður) | Økistænastan í Sandoyar sýslu |
| 2025 | Eftirlitsvitjan á Skúlanum á Trøðni | Barna- og útbúgvingarmálaráðið |
| 2025 | Kanning av nýggju ferðaseðlaskipanini hjá Strandfaraskip Landsins | Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið |

## Málsviðgerðartíðin av klagum, sum endaðu við áliti ella skrivi

Miðalviðgerðartíðin av teimum 26 endaligu viðgjørdu klagunum, har álit var skrivað, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 9

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 1 | mðr | 6 | dagar |
| Samlað | 4 | mðr | 27 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av klagum, har umboðsmaðurin hevur veitt aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Miðalviðgerðartíðin av teimum 71 klagunum, har umboðsmaðurin veitti borgarum aðra hjálp og viðgerð, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 10

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 8 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr. | 23 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin av teimum 19 avvístu klagunum var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 11

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 2 | dagar |
| Samlað | | | 14 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av bæði viðgjørdum og avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin fyri allar klagur, bæði avvístar og endaligar viðgjørdar klagur, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 12

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 14 | dagar |
| Samlað | 2 | mðr. | 8 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av málum av egnum ávum:

Miðalviðgerðartíðin av teimum 3 málunum, sum vóru avgreidd í 2025, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 13

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Samlað | 5 | mðr. | 27 | dagar |

# Sammetingar 2023–2025

Mynd 1




## Avvísingarorsøk

Mynd 2



# Innkomnar klagur býttar á málsøki

Mynd 3




# Innkomnar klagur býttar á evni

Mynd 4



## Innkomnar klagur býttar á áðalráðini við undirliggjandi stovnum, kommunur, Føroya Kærustovn og mál um børn og ung

**Ein av klagunum undir Almanna- og mentamálaráðnum er innkomin eftir umskipanina av aðalráðum. Klagan var um Almannaverkið, tí broytir klagan ikki aðalráð. Nýggja aðalráðið eitur Almanna- og heilsumálaráðið*

Mynd 5



## Innkomnar klagur 2001 – 2025

Mynd 6




Visit Faroe Islands
HOYVIK

# 4 Álit

## Álit og skriv

Umboðsmaðurin viðger klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Ein borgari kann t.d. klaga um, at ein umsókn er noktað, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og/ella framferðarháttin hjá embætisfólkum.

Um umboðsmaðurin, eftir at hava kannað málið, kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur klagaranum viðhald, kann hann finnast at tí myndugleika, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Umboðsmaðurin kann ikki sjálvur broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í summum førum er umboðsmaðurin samdur við myndugleikanum, men av tí at umboðsmaðurin metir, at evnið hevur almennan áhuga, almannakunnger umboðsmaðurin eitt skriv um niðurstøðu sína.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avgreitt við einum áliti ella skrivi.

**MÁL NR. 24/10194 og 24/10195**

## Fyrisitingarlig viðgerð av sølu burturav einum festi og lýti við lógini

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið. Málið snúði seg um, at Búnaðarstovan hevði tikið avgerð um sølu av innangarðsjørð burturav einum festi, og hesa avgerð høvdu festararnir kært. Klagan var um fyrisitingarlig brot, um samskipaða kærumálsviðgerð millum Búnaðarstovuna og Vinnumálaráðið, um notatskyldu og journalisering, og um fyrisitingarlig lýti við eini avgerð hjá Búnaðarstovuni.

Umboðsmaðurin helt, at tey lýti, sum upprunaliga vóru í eini avgerð hjá Búnaðarstovuni, seinni vóru fingin í rættlag.

Í skjølunum hjá Búnaðarstovuni sóust tó ikki notatir frá teimum fundum og telefonsamrøðum, sum høvdu verið við Vinnumálaráðið. Umboðsmaðurin metti, at Búnaðarstovan, í sambandi við málsviðgerðina, hevði roynt at fingið vegleiðing frá Vinnumálaráðnum, men hevði, sambært ráðnum og Búnaðarstovuni, hvørki fingið

beinleiðis vegleiðing um aktuella málið ella generella vegleiðing at avgreiða slík sølumál eftir. Við gjøgnumgongd av skjølunum sá umboðsmaðurin ikki nakra beinleiðis leiðbeining frá Vinnumálaráðnum. Umboðsmaðurin hevði tí ikki orsøk til at halda, at Búnaðarstovan og Vinnumálaráðið høvdu samskipað fyrisitingarligu avgerðina hjá Búnaðarstovuni og komandi kærumálsviðgerð av málinum.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Búnaðarstovuni eina átalu fyri málsviðgerðina og minti á týdningin av at notera upplýsingar frá telefonsamrøðum og fundum, sum kunnu hava týdning fyri viðgerðina av einum máli og fyri gjøgnumskygni í málsviðgerðini.

Vinnumálaráðið hevði ikki skjalført teldupostarnar frá Búnaðarstovuni við umbøn um vegleiðing, og telefonnotatir vórðu ikki skrivað frá samrøðum í hesum sambandi. Hóast tað ikki var eitt avgerðarmál hjá Vinnumálaráðnum, var talan um fyrispurningar av slíkum týdningi og vavi, sum ikki einans kundu væntast at fáa ávirkan á ítøkiliga kærumálið. Umboðsmaðurin helt tí, at Vinnumálaráðið, sambært góðum fyrisitingarsiði, átti at skjalført og gjørt notatir, so málsskjølini góvu eina greiða mynd av leiklutinum hjá ráðnum og teimum svarum, ráðið hevði givið. Vantandi skjalføring og notatir avmarkaðu møguleikan hjá umboðsmanninum at fáa yvirlit yvir málið og høvdu eisini elvt til iva og ørkymlan hjá klagarunum. Umboðsmaðurin mælti Vinnumálaráðnum til framyvir at skjalfesta samskifti í slíkum málum.

Løgtingslógin um landsjørð vísti í § 10 til, at endurgjaldsmál skuldu avgerast eftir ásetingunum í § 37 í Hagalógini, um ikki semja fekst. Hetta helt Vinnumálaráðið vera eitt mistak, sum var komið inn í lógina í 2007. Vinnumálaráðið vísti á, at ásetingin í § 10 í lóg um landsjørð sjálv staðfestir, at festari, sum missir bit, altíð hevur rætt til endurgjald, eins og ásett verður, hvat endurgjaldið skal vera í kunngerð nr. 95. frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð við seinni broytingum.

Umboðsmaðurin vísti á, at spurningurin um endurgjald fyri sølu av landsjørð skjótast gjørligt átti at verða avkláraður løgfrøðiliga, men gjørdi ikki meira við hendan partin, av tí at lógaruppskot viðvíkjandi viðurskiftunum var sent í hoyring.

Av tí at umboðsmaðurin metti seg hava rakað við lýti í Løgtingslógini um landsjørð og tilhoyrandi kunngerð, varð fráboðan send Løgtingi og landsstýrismanninum í Vinnumálum, sambært § 12, stk. 1 í lóg um Løgtingsins umboðsmann.

*Uppfylging*
*Við løgtingslóg nr. 92 frá 7. mai 2025 um broyting í løgtingslóg um landsjørð samtykti Føroya Løgting broytingar millum annað viðvíkjandi sølu burturav landsjørð og endurgjald fyri mist bit. Lógin vísir ikki longur til Hagalógina, í førum har semja ikki fæst.*

MÁL NR. 24/16558)

## Ivamál um støðu fólkakirkjunnar sum part av almennu fyrisitingini

Klaga varð send umboðsmanninum um eina kæruavgerð hjá Almanna- og mentamálaráðnum viðvíkjandi setan av nýggjum prósti. Almanna- og mentamálaráðið hevði ta fatan, at føroyska fólkakirkjan ikki er partur av almennu fyrisitingini og tí heldur ikki fevnd av eitt nú lógini um Løgtingsins umboðsmann.

Klagarin var ikki samdur í hesi fatan og førdi fram, at í øllum førum partar av virkseminum hjá fólkakirkjuni eru at meta sum fyrisitingarligt virksemi.

Umboðsmaðurin metti seg ikki kunna viðgera klaguna uttan fyrst at meta um støðu fólkakirkjunnar innan føroysku fyrisitingina, og hvørt hon var umfatað av virkisøki umboðsmansins.

Samanumtikið helt umboðsmaðurin, at føroyska fólkakirkjan í sambandi við yvirtøkuna gjørdist partur av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum, á sama hátt sum danska fólkakirkjan er undir donsku almennu fyrisitingini.

Seinni hevði Føroya Løgting tó í sambandi við løgtingsmál frá 2013 og 2023 samtykt lóggávu, hvørs fortreyt var, og hvørs viðmerkingar søgdu, at føroyska fólkakirkjan ikki er partur av føroysku fyrisitingini hjá landi ella kommunum.

Við støði í hesum helt umboðsmaðurin støðu fólkakirkjunnar sum part av almennu fyrisitingini vera so mikið ivasama, at umboðsmaðurin valdi ikki at viðgera klaguna um kæruavgerðina hjá ráðnum í sambandi við setanarmálið.

Umboðsmaðurin helt samanumtikið, at støða fólkakirkjunnar innan fyrisitingina ikki var nóg greitt ásett í lóggávuni. Ein greið støðutakan um støðu fólkakirkjunnar er avgerandi fyri heimild umboðsmansins, men ikki minni fyri í hvønn mun fólkakirkjan skal fylgja vanligu fyrisitingarrættarligu lógum okkara í sambandi við fyrisitingarligt virksemi. Umboðsmaðurin sendi tí fráboðan um lýti við lóggávuni, sambært § 12 í umboðsmanslógini, til Løgtingið og landsstýriskvinnuna í Almanna- og mentamálum.

MÁL NR. 24/21405

## Barnaverndartænastan í Tórshavnar kommunu fekk átalu fyri málsviðgerðina av einum barnaverndarmáli

Ein advokatur klagaði vegna sín klient um málsviðgerðina og málsviðgerðartíðina hjá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu í einum barnaverndarmáli.

Umboðsmaðurin lokaði klaguna í fyrstu syftu, tí umboðsmaðurin samanumtikið ikki fann orsøk at halda, at barnaverndartænastan hevði latið málið komið í drag vegna drál.

Barnaverndartænastan hevði viðurkent, at hon ikki hevði hildið lógarfestu eftirmetingarskylduna á seks mánaðir í barnaverndarlógini. Ein eftirmeting av málinum, ið av røttum skuldi verið í mai 2024, varð framd í august 2024. Umboðsmaðurin minti barnaverndartænastuna á at framyvir at halda lógarásettu eftirmetingarskylduna og gav sær eisini far um, at gongd alla tíðina hevði verið í málinum, og at barnaverndartænastan hevði boðað klagaranum frá, at ein eftirmeting skuldi verða aftur í februar 2025.

Í apríl 2025 vendi klagarin sær aftur til umboðsmannin, har hann boðaði frá, at hann framvegis onki hevði frætt frá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu.

Eftir at hava fingið frágreiðing frá barnaverndartænastuni, valdi umboðsmaðurin at taka málið uppaftur.

Barnaverndartænastan vísti á, at stórt arbeiðstrýst á stovninum hevði gjørt, at málið var komið í drag.

Umboðsmaðurin vísti á, at ein myndugleiki hevur skyldu at skipa síni viðurskifti soleiðis, at eitt nú stór arbeiðsbyrða nervar vanligu málsviðgerðina hjá myndugleikanum sum minst.

Umboðsmaðurin helt, at stórt arbeiðstrýst ikki kundi nýtast sum umberandi orsøk fyri, at lógarásetta eftirmetingin ikki varð framd til tíðina í februar 2025, men í mai 2025, ið var nærum tríggjar mánaðir ov seint. Umboðsmaðurin vísti á, at tað var av stórum týdningi, at lógarásetta freistin á seks mánaðir í barnaverndarlógini varð hildin.

Undir klagumálsviðgerðini bað umboðsmaðurin barnaverndartænastuna um frágreiðing um málið og noyddist í tveimum førum at minna barnaverndartænastuna á málið. Hetta helt umboðsmaðurin ikki vera nøktandi.

Umboðsmaðurin gav samanumtikið barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli og fyri málsviðgerðina í sambandi við klagumálsviðgerðina hjá umboðsmanninum.

MÁL NR. 24/22050

## Sunda kommuna fekk átalu fyri málsviðgerðina av einari umbøn um alment innlit

Frihedsbrevet klagaði til umboðsmannin um málsviðgerðina hjá Sunda kommunu av einari umbøn um innlit.

Sunda kommuna hevði víst til § 4, stk. 3 í innlitslógini sum grundarlag fyri ikki at ganga umbønini á møti.  Umboðsmaðurin vísti m.a. á vegleiðing til innlitslógina, har tað stóð at lesa, at hóast talan var um eitt krav um eyðmerking í innlitslógini, so átti ein myndugleiki at ganga umbønum um innlit frá fjølmiðlum á møti, um ikki annað fylgdi av reglum um tagnarskyldu o.tíl.

Umboðsmaðurin helt tað tískil ikki vera rætt, at Sunda kommuna vísti til § 4, stk. 3 í innlitslógini sum grundarlag fyri ikki at ganga umbønini um innlit á møti.

Sunda kommuna hevði eisini í frágreiðing til umboðsmannin víst á sína egnu skipan at skjalføra upplýsingar sum partur av grundgevingini fyri, at umbønin um innlit ikki kundi gangast á møti. Umboðsmaðurin dugdi ikki at síggja, at Sunda kommuna kundi nýta sína egnu skipan sum grundgeving. Umboðsmaðurin helt, at talan var um eitt rættiliga avmarkað tal av arbeiðstakarum og arbeiðstøkum, ið umbønin um innlit fevndi um. Umboðsmaðurin minti Sunda kommunu á, at ein myndugleiki hevur skyldu til at skipa sínar arbeiðsgongdir og skipanir soleiðis, at innlit kann veitast, samsvarandi ásetingunum í innlitslógini.

Aftaná klaguna til umboðsmannin veitti Sunda kommuna klagaranum innlit. Í sambandi við avgreiðsluna av innlitsumbønini kravdi Sunda kommuna eitt undangjald fyri avritini. Í frágreiðing í sambandi við kanning hjá umboðsmanninum um viðgerð av málum um alment innlit frá 2023, gav umboðsmaðurin viðmerking til Sunda kommunu um, at undangjald ikki eigur at verða kravt, uttan so, at talan er um eina serstøðu. Umboðsmaðurin bað í frágreiðingini Sunda kommunu um at broyta sínar mannagongdir fyri at krevja gjald.

Umboðsmaðurin helt tað vera atfinningarsamt, at Sunda kommuna framvegis ikki hevði broytt sínar mannagongdir fyri at krevja gjald. Umboðsmaðurin sá einki í málinum, ið talaði fyri, at talan var um eina serstøðu, ið loyvdi kommununi at krevja undangjald. Umboðsmaðurin gav Sunda kommunu eina átalu fyri avgreiðsluna av umbøn klagarans um innlit og fyri ikki at hava broytt sínar mannagongdir at krevja gjald, soleiðis at undangjald einans varð kravt í einari serstøðu.

MÁL NR. 24/23387

## Tað var av røttum, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevði noktað innlit í navnið á einum ráðgeva

Ein fjølmiðil klagaði til umboðsmannin um, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevði strikað ávísar upplýsingar og nøvn í skjølunum í eini umsókn um vinnuligar fiskiroyndir, sum teir høvdu søkt og fingu innlit í.

Tá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið gav klagaranum innlit í umsóknina um vinnuligar fiskiroyndir, avgjørdi ráðið ikki at lata innlit í ávísar upplýsingar um verkætlanina. Eisini varð avgjørt ikki at geva innlit í navnið á einum ráðgeva.

Viðvíkjandi upplýsingunum um verkætlanina avgjørdi ráðið ikki at lata innlit í upplýsingar um verkætlanina, undir hesum hvat hon snúði seg um, framleiðsluhættir, fíggjarligar upplýsingar um verkætlanina, hvat úrslitið var og kundi brúkast til o.s.fr.. Ráðið vísti á, at nevndu upplýsingar vóru um virkisviðurskifti og vóru fevnd av § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit (lóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina). Ráðið metti, at um innlit varð latið í upplýsingarnar, var verkætlanin almenn, og onkur kundi nýta hugskot og aðrar upplýsingar til egna framleiðslu og harvið skatt marknaðarmøguleikarnar hjá viðkomandi felag. Sambært ráðnum kundi innlit í nevndu upplýsingar hava við sær ein týðandi fíggjarligan miss fyri felagið. Umboðsmaðurin var samdur við ráðnum í hesi meting

Viðvíkjandi upplýsingini um navn á ráðgeva í verkætlanini hevði ráðið fyrst grundað avgerðina á, at ráðgevin tók seg úr verkætlanini, um navnið varð upplýst, og harvið var stórur vandi fyri týðandi fíggjarligum tapi hjá felagnum. Ráðið vísti í hesum sambandi m.a. á ein starvsklausul hjá viðkomandi. Umboðsmaðurin helt, at hóast ráðgevandi persónurin kundi javnsetast við eitt handilssamband, sum var ein upplýsing, ið eftir ítøkiligari meting kundi verið undantikið innliti, so førdi upplýsingin um starvsklausulin hjá hesum persóni við sær, at tað var ivasamt, hvørt tað var í tráð við endamálið við innlitslógini at undantak fyri innliti varð givið á hesum grundarlag.

Eftir áheitan frá umboðsmanninum kannaði ráðið støðuna hjá ráðgevandi persóninum av nýggjum. Ráðið kom tá til ta niðurstøðu, at navnið hjá viðkomandi var at meta sum ein virkisloynidómur hjá felagnum, tí við at geva innlit í navnið fekst eisini vitan um verkætlanina. Umboðsmaðurin metti, at á hesum grundarlagi, var tað rætt, at ráðið við heimild í § 12. stk. 1 nr. 2 í innlitslógini hevði noktað innlit í navnið.

Undir klagumálsviðgerðini hevði klagarin viðmerkt, at tað sýntist sum, tað loysti seg hjá aktørunum í málinum at draga umbønir um innlit í langdrag, so tær kanska ikki longur vóru aktuellar yvirhøvur, tá málið varð avgreitt. Umboðsmaðurin avvísti, at hetta var galdandi í hesum føri.

MÁL NR. 24/26860

## TAKS fekk álvarsliga átalu fyri handfaringina av máli um lækkan í útgjaldi á Samhaldsføstu pensjónini

Ein borgari, búsitandi í Stóra Bretlandi, klagaði um framferðina hjá TAKS í sambandi við eina lækkan í útgjaldinum á Samhaldføstu pensjónini.

Fyrst fekk hann upplýst, at talan var um eina villu, síðani fekk hann upplýst, at lækkanin skyldaðist eini skattabroyting, ið var ein fylgja av Brexit.

Klagarin meinti, at skattabroytingin átti at verið framd við gjøgnumskygni og á eins hátt fyri allar persónar, ið vóru fevndir av broytingini, og hann saknaði almenna kunning frammanundan.

Stóra Bretland tók seg úr EØS í 2020, men broytingin var ikki framd í verki yvir fyri borgaranum fyrr enn í 2024.

TAKS hevði upprunaliga einki eftirlit gjørt fyri at tryggja, at persónar í Stóra Bretlandi, sum longu móttóku pensjónsveitingar úr Føroyum, vóru rætt skrásettir í skipanini aftan á Brexit.

Vantandi eftirlitið hevði at sýna til havt við sær, at TAKS hevði framt skattabroytingina av pensjónsgjøldum tilvildarliga og fleiri ár seinkað fyri teir persónar, sum vóru ávirkaðir av broytingini.

Harumframt hevði TAKS ikki innan rímiliga tíð svarað fyrispurningum frá klagaranum. Umboðsmaðurin gav TAKS eina álvarsliga átalu fyri handfaringina og sendi, samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini, fráboðan til formansskap Løgtingsins, løgmann og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum.

MÁL NR. 24/17152

## Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum átalu fyri ikki at hava tikið stig til at broyta mangulfullu reglurnar um útskriving av fiskiloyvi 5A og 5B.

Felag, sum hevði rætt til fiskiloyvi í bólki 5, søkti um fiskiloyvi 5A fyri 2024. Vørn sýtti fyri at útskriva felagnum fiskiloyvi 5A, men útskrivaði í staðin fiskiloyvi 5B. Avgerðin hjá Vørn varð kærd til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið.

Ráðið staðfesti avgerðina hjá Vørn og vísti á, at treytin fyri, at rættindahavari í bólki 5 kann fáa fiskiloyvi 5A, er, at eigarin við fiskifarinum næstseinasta álmanakkaár áðrenn umsóknarárið hevði avreitt fyri minst 200.000. Ráðið vísti í hesum sambandi á, at tað er áralang siðvenja at knýta fiskifar og avreiðingarvirði saman. Felagið leyk ikki hesa treyt við nýggja fiskifarinum, sum tað hevði útvegað sær í 2023, og staðfesti ráðið tí avgerðina hjá Vørn.

Ráðið viðmerkti, at tað var greitt yvir, at henda siðvenja kundi tykjast óheppin og førdi til, at rættindahavari, sum útvegaði sær nýtt fiskifar, ikki kundi fáa útskrivað fiskiloyvi 5A fyrr enn 2 ár eftir keyp av nýggjum fiskifari.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at siðvenjan førdi til, at skipanin við útskriving av fiskiloyvi 5A og 5B tyktist ósamanhangandi og mangulfull, tí hon tók ikki hædd fyri, at tað er ein natúrlig støða, at tað kann gerast neyðugt at útskifta fiskifar. Umboðsmaðurin helt, at reglurnar um útskriving av fiskiloyvi 5A og 5B vóru mangulfullar, tá eingin áseting var, sum reguleraði støðuna í sambandi við skifti av fiskifari.

Umboðsmaðurin metti, at siðvenjan hjá Vørn, við at knýta nýggja fiskifarið at ásetingini í § 2 stk. 1 nr. 1 í kunngerð nr. 76 frá 2019, sum snýr seg um avreiðingarvirði 2 ár frammanundan, var ivasom. Umboðsmaðurin helt seg tó ikki hava grundarlag fyri at siga, at siðvenjan var beinleiðis í stríð við ávísa lógar– ella kunngerðaráseting. Umboðsmaðurin metti, at tørvur var á at gera reglur um hesi viðurskifti, og heitti tí á ráðið um sum skjótast at gera lóggávu, sum skipar viðurskiftini við fiskiloyvi 5A og 5B, tá rættindahavari skiftir fiskifar.

Umboðsmaðurin gav Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum eina átalu fyri ikki at hava tikið stig til at greiða hesi viðurskifti, hóast ráðið í longri tíð hevði vitað, at trupulleikar stóðust av, at økið ikki var regulerað.

Hvat viðvíkti ítøkiliga málinum viðmerkti umboðsmaðurin, at sambært Vørn vóru nokk av fiskidøgum til bólk 5 bæði í 2023 og 2024, eisini til rættindahavara við fiskiloyvi 5B. Hetta, og at umboðsmaðurin ikki hevði grundarlag fyri at siga, at ivasama siðvenjan hjá Vørn beinleiðis fór út um heimildargrundarlagið, sambært Sjófeingislógini og viðkomandi kunngerð, førdi við sær, at umboðsmaðurin ikki gjørdi meira við ítøkiliga málið.

Við tað, at umboðsmaðurin metti, at talan var um lýti við lóggávuni – Sjófeingislógini og tilhoyrandi kunngerð um fiskiloyvi 5A og 5B – var fráboðan, samsvarandi § 12 í umboðsmanslógini, send Løgtinginum og landsstýrismanninum í fiskivinnu– og samferðslumálum.



MÁL NR. 24/27154

## Eiðis kommuna fekk átalu fyri handfaringina av einum máli um keyp av fastogn og garðbygging

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at hann ikki hevði fingið svar frá Eiðis kommunu til umsókn sína um keyp av fastogn og um garðbygging og um innlit og fyrispurningar í hesum sambandi.

Borgarin hevði enn ikki fingið svar yvir eitt ár eftir, at hann hevði sent kommununi umsóknina um keyp av fastogn.
Borgarin hevði heldur ikki í fingið svar til fyrispurningar sínar, sum hann setti í mai 2024, um umsóknina um keyp av fastogn, umframt fyrispurningar um garðbygging og innlitsumbøn sína.

Eiðis kommuna harmaðist um, at borgarin ikki hevði fingið svar uppá fyrispurningar sínar í sambandi við keyp av fastogn og upplýsti, at kommunan miðaði eftir at svara borgaranum innan 14 dagar.

Harumframt upplýsti kommunan, at innlit fór at verða latið borgaranum skjótast gjørligt.

Kommunan vísti á, at eitt starvsfólk var farið í annað starv, og at málið av teirri orsøk ongantíð var avgreitt.
Harumframt upplýsti kommunan, at samskiftið við klagaran umvegis telefon ikki var noterað.

Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi og ei heldur í samsvari við góðan fyrisitingarsið, at klagarin í yvir eitt ár ikki hevði fingið svar til umsókn sína um keyp av fastogn og heldur ikki hevði fingið svar til fyrispurningar sínar um garðbygging og innlit, og at svarfreistin, sambært § 16 í innlitslógini, ikki var hildin.
Harumframt helt umboðsmaðurin tað ikki vera nøktandi, at kommunan ikki hevði hildið notatskyldu sína.
Umboðsmaðurin gav tí Eiðis kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum.

MÁL NR. 24/27382

## Landsverk átalu fyri drúgva málsviðgerð og handfaringini av einum innlitsmáli

Setiumboðsmaður viðgjørdi eina klagu um vantandi svar frá Landsverk uppá eina umbøn um innlit.

Umbønin um innlit var samansett av umbøn um innlit og fyrispurningum. Umbønin um innlit varð svarað undir klagumálsviðgerðini, meðan ein fyrispurningur ikki sást svaraður.

Undir klagumálsviðgerðini setti klagarin fram nýggja umbøn um innlit og nýggjar spurningar.

Við tað at setiumboðsmaðurin metti, at avgreiðslan av innlitsumbønunum var ov drúgv, og Landsverk ikki hevði givið klagaranum fráboðan um avgreiðsluna av málinum innan ásettu 10 dagarnar í § 16, stk. 2 innlitslógini, gav setiumboðsmaðurin Landsverk eina átalu fyri handfaringina av málinum. Setiumboðsmaðurin gav eisini Landsverk átalu fyri ikki at svara spurningunum frá klagaranum innan rímiliga tíð og fyri ikki at hava havt nóg greiða skjalføring av skjølunum í teimum viðkomandi málunum.

***Um tú ivast hvat ein setiumboðsmaður er****: Ein setiumboðsmaður tekur sær av einum ávísum máli, tá ið umboðsmaðurin er ógegnigur. Sambært § 14 stk. 3 í umboðsmanslógini er tað Formansskapurin í Løgtinginum, sum tekur støðu til, um umboðsmaðurin er ógegnigur.*

MÁL NR. 24/28933

## Tórshavnar kommuna hevði ikki viðgjørt innlitsmál á nøktandi hátt

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um málsviðgerðartíðina og málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu av einari umbøn um innlit.

Tórshavnar kommuna gav eftir 44 døgum klagaranum noktandi svar til umbøn hansara um innlit. Tórshavnar kommuna hevði í hesum tíðarskeiði ikki givið nakra kunning til klagaran um orsøkina til seinkanina, og nær ein avgerð kundi væntast.

Umboðsmaðurin helt, at grundgevingin, ið Tórshavnar kommuna hevði givið klagaranum, ikki leyk kravið um grundgeving í fyrisitingarlógini. Tá Tórshavnar kommuna vísti til § 13, stk.1, nr. 5 og 6 í innlitslógini, átti kommunan eisini at greitt frá, hví kommunan var komin til ta niðurstøðu, at innlit ikki kundi latast, umframt hvørji atlit høvdu verið avgerandi fyri hesari avgerð. Einans at vísa til rættarregluna sum grundgeving helt umboðsmaðurin als ikki vera nøktandi, og lýstu viðurskiftini í málinum kundu eftir umboðsmansins meting ikki rúmast í heimildargrundarlagnum í § 13, stk. 1, nr. 5 og 6.

Harafturat helt umboðsmaðurin tað vera atfinningarsamt, at Tórshavnar kommuna ikki hevði viðgjørt møguleikan at gera klagaran kunnigan við upplýsingar, ið ikki vóru undantiknar skjalainnliti, sambært § 13, stk. 1 nr. 5 og 6, sonevnd ekstrahering.

Tórshavnar kommuna hevði ikki hildið tær klagumálsfreistir, ið umboðsmaðurin hevði sett. Umboðsmaðurin minti tí á, at kommunan átti at verið vitandi um týdningin av at halda hesar freistir.

Tórshavnar kommuna fekk samanumtikið eina átalu fyri handfaringina av málinum.

MÁL NR. 25/00168 og 24/16456

## Løgmansskrivstovuna biðin um at endurskoða málið um eftirløn til fyrrverandi landsstýrismann við 60 ára aldur

Klagað varð um, at Løgmansskrivstovan tulkaði reglurnar um eftirløn til landsstýrismenn við 60 ára aldur í landsstýrislønarlógini á slíkan hátt, at klagarin ikki hevði rætt til eftirløn við 60 ára aldur.

Víst varð í hesum sambandi á skriv frá Løgmansskrivstovuni, har lagt varð til grund, at ár í aldri og starvstíð, sum vóru aftaná 15. sept. 2015, ikki kundu teljast við í útrokningini eftir § 3, stk. 2 í landsstýrislønarlógini. Klagarin metti, at hendan tulkingin var skeiv.

Umboðsmaðurin vísti á, at eftirlønarskipanin hjá landsstýrismonnum varð broytt í 2015, soleiðis at farið var frá eini tænastumannalíknandi eftirlønarskipan til eina skipan, sum líkist teirri skipan, sum er vanlig hjá alment settum starvsfólkum, sum ikki eru tænastumenn. Tá varð samstundis gjørd ein skiftisskipan fyri landsstýrismenn, sum sita ella hava sitið sum landsstýrismenn. Skiftisskipanin varð tó avmarkað av orðingini: "Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag".

Lógarbroytingin, tilhoyrandi kunngerð og viðmerkingarnar til lógarbroytingina góvu ikki eitt greitt svar uppá, hvussu reglurnar um skiftisskipanina skuldu skiljast. Møguleiki tyktist vera fyri at tulka orðingina um skiftisskipanina soleiðis, at orðingin "eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag" kundi vísa til § 3, stk. 2 í landsstýrislønarlógini og harvið fastlæsa útrokningina, sum avgerð sjálvan rættin til pensjón. Møguleiki tyktist eisini vera fyri, at tulka orðingina soleiðis, at ávísingin vísti til § 3 stk. 3, sum einans fastlæsti støddina á pensjónini, sum kundi útgjaldast í eftirløn við 60 ára aldur.
Vísandi til ivan, sum var í málinum, og at Løgmansskrivstovan, sambært málsskjølunum, ikki hevði viðgjørt spurningin um, hvørt orðið "eftirlønaraldurin" kundi víst til ásetingina í § 3, stk. 3 heldur enn til ásetingina í § 3, stk. 2, og at hetta kundi verið avgerandi fyri eftirlønarviðurskiftini hjá viðkomandi landsstýrismanni, heitti umboðsmaðurin á Løgmansskrivstovuna um at taka málið til nýggja viðgerð.

Eftir nýggja meting av málinum, fasthelt Løgmansskrivstovan, at útrokningin í § 3, stk. 2 í landsstýrislønarlógini um aldur og starvsaldur ikki hækkar eftir 15. sept. 2015, og at klagarin tí ikki leyk treytirnar fyri eftirløn við 60 ára aldur. Umboðsmaðurin var ikki samdur í hesi niðurstøðu. Umboðsmaðurin metti, at úrgildissetu- og skiftisreglurnar frá 15. sept. 2015 steðgaðu hækkingini av eftirlønini sambært § 3, stk. 3, men ikki rættindaútrokningini av aldri og starvstíð sambært § 3, stk. 2. Reglan í § 3, stk. 2 í landsstýrislønarlógini hevði tí, eftir meting umboðsmansins, framvegis gildið fyri landsstýrismenn, sum høvdu sitið ella sótu í landsstýrinum pr. 15. sept. 2015.

Umboðsmaðurin heitti á Løgmansskrivstovuna um at endurskoða málið um eftirløn til klagaran við 60 ára aldur og bað Løgmansskrivstovuna lata seg frætta, hvat víðari hendi í málinum.

Málið er framhald av "Skriv um treytirnar sambært landsstýrislønarlógini fyri eftirløn við 60 ára aldur" LUM. nr. 24/16456

*Dagføring: Tann 7. apríl 2025 kunnaði Løgmansskrivstovan Løgtingsins umboðsmann um, at málið var tikið upp til nýggja viðgerð við tí grundgeving, at ár eftir 2015 eisini kunnu teljast við í uppgerðina til tey 95 árini, og at játtanarskriv varð sent klagaranum.*

**MÁL NR. 25/01251, 25/06200, 25/07541 og 25/08634**

## Umboðsmaðurin gav Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum álvarsliga átalu fyri handfaringina av fýra arbeiðsskaðamálum

Í tíðarskeiðnum 14. januar 2025 til 26. mars 2025 fekk umboðsmaðurin 4 klagur um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við arbeiðsskaðamál.

Í trimum av klagunum var spurningur um málsviðgerðartíð, meðan í tveimum av klagunum var spurningur um vantandi svar.

Í teimum klagunum, ið snúðu seg um málsviðgerðartíð, høvdu málini verið virkin í meir enn 2,5 ár, uttan at endalig avgerð ella fyribils avgerð var tikin.

Í teimum klagunum, ið snúðu seg um vantandi svar, hevði eini klagarin ikki fingið svar ella afturboðan í tveir mánaðir til fyrispurning sín. Í hini klaguni um vantandi svar, sýntist tað, at klagarin ikki fekk nakað svar ella afturboðan til fyrispurningin, sum hann setti í september 2024.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið vísti á, at longda málsviðgerðartíðin og vantandi svar lutvíst skyldaðist, at stovnurin hevði havt stórar avbjóðingar í sambandi við yvirtøkuna av umsitingini av arbeiðsskaðamálum frá Føroya Rætti.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiddi eisini frá, at fleiri stig nú vóru tikin til at betra um málsviðgerðartíðina og svartíðina til borgarar.

Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi, at málini høvdu verið virkin í meir enn 2,5 ár, uttan at endalig avgerð ella fyribils avgerð var tikin, og at klagararnir ikki høvdu fingið svar innan rímiliga tíð.

Undir klagumálsviðgerðini gjørdist umboðsmaðurin varugur við, at skjalføringin hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í viðkomandi málunum var ófullfíggjað, og fekk umboðsmaðurin í fleiri umførum skeivar upplýsingar og ov sein svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Umboðsmaðurin gav samanumtikið Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av teimum fýra arbeiðsskaðamálunum og minti Arbeiðs- og brunaeftirlitið á at svara umboðsmanninum innan ásettu freistirnar.

*Dagføring: Í januar 2026 varð hildin kunnandi fundur, har Arbeiðs- og brunaeftirlitið sum skrivstova hjá Føroya Vanlukkutryggingarráð greiddi frá teimum broytingum, sum vóru framdar. Arbeitt varð nú eftir einum fastløgdum uppruddingarleisti, har elstu málini fingu hægstu raðfestingina, samstundis sum miðjað varð eftir at halda gongd í øllum øðrum málum. At avgreiða mál, har 2 ára freistin var farin ella um at fara, hevði í hesum sambandi hægstu raðfesting.*



MÁL NR. 25/04771

## Fuglafjarðar kommuna fekk eina átalu fyri ikki at svara borgara innan rímiliga tíð og fyri ikki at viðgera innlitsumbøn hansara innan lógarásettu freistina

Ein borgari klagaði um, at Fuglafjarðar kommuna ikki svaraði hansara fyrispurningum í sambandi við eitt undirliggjandi byggimál.

Klagarin hevði, tann 8. mars og 5. november 2024, sent kommununi fyrispurningar um undiliggjandi málið og bað í teldupostinum frá 5. november 2024 eisini um innlit í, hvat útgrevstur og alt annað arbeiði hevði kostað kommununi higartil.

Klagarin fekk ikki svar frá kommununi fyrr enn tann 7. mars 2025, har kommunan millum annað upplýsti, hvat kostnaðurin hevði verið fyri at byggibúgva økið, og hvat prísurin á lendinum var áleið. Kommunan lat tó ikki klagaranum nøkur skjøl.

Umboðsmaðurin metti, at kommunan, sambært góðum fyrisitingarsiði, ikki hevði svarað klagaranum innan rímiliga tíð, og at kommunan ikki hevði viðgjørt innlitsumbønina skjótast gjørligt og innan lógarásettu freistina.

Umboðsmaðurin gjørdi vart við, at tá klagarin bað um innlit í kostnaðin, átti kommunan at tryggjað sær, hvørt talan var um ein fyrispurning ella eina umbøn um innlit í skjøl.

Av skjalayvirlitinum sást, at Fuglafjarðar kommuna ikki hevði skjalført teldupostarnar, sum klagarin sendi kommununi, tann 8. mars 2024 og 5. november 2024.

Umboðsmaðurin gav Fuglafjarðar kommunu eina átalu fyri ikki at hava svarað klagaranum innan rímiliga tíð og fyri ikki at hava viðgjørt innlitsumbønina skjótast gjørligt og innan lógarásettu freistina.

Eisini minti umboðsmaðurin kommununa á at skjalføra inngangandi teldupostar stundisliga, so teir ikki detta niður ímillum og tí ikki verða svaraðir.

MÁL NR. 25/05230 og 25/02000

## Fíggjarmálaráðið kundi við kunngerð kunna um, at linkingarhátturin sambært norðurlendsku tvískattasáttmálanum fór at verða broyttur, og nær broytingin fekk virknað

Ein advokatur klagaði vegna áhugafelag um, at landsstýriskvinnan í fíggjarmálum í september 2024 hevði lýst eina broyting av linkingarháttinum, sambært norðurlendsku

tvískattaavtaluni við kunngerð, heldur enn lóg. Eisini klagaði ein borgari um somu viðurskifti.

Persónar, sum arbeiddu uttanlands og higartil høvdu fingið linking í skattaútrokningini í sambandi við uttanlandsinntøku eftir sonevnda eksemption linkingarháttinum, høvdu verið lagaligari skattaðir enn persónar við lønarinntøku úr Føroyum. Broytingin, sum fekk virknað 1. januar 2025, hevði við sær, at framyvir fór linkingin í skattaútrokningini at verða givin eftir øðrum linkingarhátti, sum gjørdi, at hesir persónar koma at rinda meira í skatti í Føroyum enn higartil. Klagarin metti, at slík broyting bert kundi fáa virknað yvirfyri borgarum í Føroyum, um broytingin varð lýst við lóg.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at møguleikin fyri at broyta linkingarháttin í tvískattasáttmálanum var samtyktur við løgtingslógargildi. Fráboðanin um broytta linkingarháttin var eftir meting umboðsmansins framd við neyðugum mandati og samsvarandi lógarfyriskrivaðu mannagongdini um, hvussu broytingin kundi fáa gildi. Harvið fekk broytingin í tvískattasáttmálanum lógargildi og kundi verða nýtt fyri skatting eftirfylgjandi ár.

Umboðsmaðurin helt, at kunngerð nr. 95 frá 4. september 2024 var at meta sum ein kunning um, at linkingarhátturin fór at verða broyttur, og nær broytingin fekk virknað. Av hesum ávum helt umboðsmaðurin, at kunngerðin ikki innihelt viðurskifti, sum kravdu nýggja lógarviðgerð.

Umboðsmaðurin avgjørdi tí ikki at gera meira við klagumálið.

**MÁL NR. 25/05920**

## Landsstýrismaðurin hevði ikki heimild heilt at forbjóða ræning av lomvigareggum í longri áramál

Eitt áhugafelag hevði søkt um loyvi at ræna í mesta lagi 500 lomvigaregg eina viku í mai 2025.
Tjóðsavnið hevði noktað umsóknini.

Noktandi avgerðin var grundað á, at tað ikki varð mett ráðiligt at gera inntriv í reiðringina hjá lomviga nakrastaðni í Føroyum, tá samlaði stovnurin enn kann metast at vera í niðurgongd. Tjóðsavnið hevur síðani 2010 einans givið eitt avmarkað loyvi til ræning av lomvigareggum í 2014.

Sambært Fuglaveiðulógini er loyvt at taka lomvigaregg á hvørjum ári til og við 8. juni á ávísum støðum í ávísum fuglabjørgum eftir nærri kunngerð frá landsstýrismanninum. Treytin fyri at fáa loyvi, sambært kunngerðini, er millum annað, at Tjóðsavnið metir, at ræningin ikki skaðar stovnin munandi.

Áhugafelagið helt, at tann nøgd tey søktu um ikki kundi metast at skaða stovnin munandi. Umboðsmaðurin vísti á, at grundgevingin fyri at seta ræning av lomvigareggum inn í

Fuglaveiðulógina í 1986 var, at vandi var fyri at siðurin at ræna egg fall burtur.

Umboðsmaðurin helt tí ikki, at Fuglaveiðulógin heimilar landsstýrismanninum heilt at forbjóða ræning í longri áramál uttan at taka atlit at ynskinum at varðveita siðin at ræna egg. Umboðsmaðurin ásannaði, at avmarkandi umsitingin av kunngerðini um ræning av lomvigareggum hevði verið fylgd í fleiri ár vegna stúran um lomvigarstovnin.

Umboðsmaðurin mælti til, at Almanna- og mentamálaráðið endurskoðaði kæruavgerðina og avmarkandi umsitingina av kunngerðini ella heitti á Uttanríkis- og vinnumálaráðið um at endurskoða heimildina fyri ræning av lomvigareggum í Fuglaveiðulógini, so samsvar var millum Fuglaveiðulógina, kunngerðina um ræning av lomvigareggum og umsitingina av henni.

*Uppfylging*
*Almanna- og mentamálaráðið boðaði frá, at ráðið fór at geva Tjóðsavninum boð um at taka umsóknina hjá Áhugafelagnum upp til nýggja viðgerð vísandi til niðurstøðu umboðsmansins. Eitt treytað loyvi var síðani givið Áhugafelagnum.*
*Eisini boðaði ráðið frá, at tað fór at seta seg í samband við Uttanríkis- og vinnumálaráðið viðvíkjandi kunngerð um ræning av lomvigaeggum og heimildarásetingini í § 18, stk. 2 í løgtingslóg um fuglaveiðu.*

**MÁL NR. 25/07600**

## Løgmálaráðið skuldi taka kærumál um kommunuvalið í Runavíkar kommunu til nýggja viðgerð

Borgari, sum hevði sent kæru til Løgmálaráðið um kommunuvalið í Runavíkar kommunu í november 2024, klagaði um, at Løgmálaráðið hevði avgjørt ikki at gera nakað við kæru hansara, tí málið eisini var meldað til løgregluna sum valsvik. Borgarin hevði eisini kært avgerðina frá Løgmálaráðnum til løgmann. Eftir at hann ikki fekk viðhald frá Løgmansskrivstovuni, vendi borgarin sær til Løgtingsins umboðsmann við klagu um Løgmálaráðið og Løgmansskrivstovuna.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at kæran var ikki einans um valsvik, men eisini um fyrisitingarligar spurningar so sum gegni og mannagongdir í sambandi við valið, og at hesi viðurskifti kundu viðgerast óheft – ella við fyrivarni fyri - at meldað var um valsvik. Umboðsmaðurin mælti tí Løgmálaráðnum at taka málið til nýggja viðgerð.

Grundað á, at løgmaður ikki er ein vanligur kærustovnur fyri avgerðini hjá Løgmálaráðnum, men at viðgerðin hjá løgmanni var ein spurningur um landsstýrismannaábyrgd, samsvarandi stýrisskipanarlógini § 33, stk. 3, hevði umboðsmaðurin ikki viðmerkingar til niðurstøðuna hjá Løgmansskrivstovuni. (25/07600)

*Dagføring: Tann 2. mai 2025 boðaði Løgmálaráðið klagaranum og Løgtingsins umboðsmanni frá, at Løgmálaráðið, í samsvari við tilmælið frá Løgtingsins umboðsmannin, hevði tikið kærumálið upp aftur við Runavíkar kommunu.*
*Tann 24. juli 2025 sendi Løgmálaráðið umboðsmanninum niðurstøðuni hjá ráðnum um fyrisitingarligu viðgerðina hjá Runavíkar kommunu av kæruni um møguligt valsvik. Samanumtikið helt ráðið, at kommunan hevði tikið støðu til gegni á nøktandi hátt, og at fyrisitingarliga viðgerðin hjá Runavíkar kommunu av kæruni um valsvik hevði verið nøktandi.*

**MÁL NR. 25/09158**

## Arbeiðs- og brunaeftirlitið fekk átalu fyri málsviðgerðina av einari umbøn um alment innlit

Ein journalistur hjá Kringvarpi Føroya klagaði til umboðsmannin um málsviðgerðina av einari umbøn um innlit hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Umbøn klagarans varð ikki avgreidd fyrr enn 38 dagar vóru farnir, síðan umbønin varð latin stovninum, og eingin fráboðan var givin klagaranum í hesum tíðarskeiði. Hetta helt umboðsmaðurin vera átaluvert.

Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi á, at sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini hevur ein myndugleiki skyldu at avgreiða innlitsumbønir skjótast gjørligt og geva umsøkjara fráboðan, um so er, at ein innlitsumbøn ikki kann avgreiðast innan 10 dagar.

Umboðsmaðurin helt, at tær orsøkir, ið Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði víst á sum atvold til longu málsviðgerðartíðina, ikki kundu metast sum umberandi orsøk fyri, at ongin kunning varð givin til klagaran um støðuna og útlitini fyri, nær innlitsumbønin fór at verða avgreidd.

Í sambandi við at klagan varð send Arbeiðs- og brunaeftirlitinum til ummælis, helt umboðsmaðurin tað heldur ikki verða nøktandi, at Arbeiðs- og brunaeftirlitið ikki svaraði fyrr enn 20 dagar aftaná freistina, ið umboðsmaðurin hevði sett stovninum.

Umboðsmaðurin gav samanumtikið Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli.



MÁL NR. 25/09315

## Arbeiðs- og brunaeftirlitið átalu fyri langa málsviðgerðartíð og málsviðgerðina av einum innlitsmáli

Eitt áhugafelag klagaði til umboðsmannin um málsviðgerðina av einari umbøn um innlit hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.

Umbøn klagarans varð ikki svarað fyrr enn 3½ mánað eftir, at umbønin varð latin Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, og eingin móttøkuváttan ella fráboðan var givin klagaranum í hesum tíðarskeiði. Hetta helt umboðsmaðurin vera átaluvert, serliga tá Arbeiðs- og brunaeftirlitið í svarinum til innlitsumbønina greiddi frá, at stovnurin ikki hevði skjøl fevnd av innlitsumbønini, og at orsøkin til hetta var, at viðurskiftini handan innlitsumbønina ikki vórðu fevnd av virkisøkinum hjá stovninum.

Í hesum sambandi vísti umboðsmaðurin á, at sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini hevur ein myndugleiki skyldu at avgreiða innlitsumbønir skjótast gjørligt og geva umsøkjara fráboðan, um so er, at ein innlitsumbøn ikki kann avgreiðast innan 10 dagar.

Umboðsmaðurin helt, at tær orsøkir – ovurhonds stór arbeiðsbyrða á stovninum og sjúka -, ið Arbeiðs- og brunaeftirlitið hevði víst á sum grund til longu málsviðgerðartíðina, ikki kundu metast sum umberandi orsøk fyri drúgvu málsviðgerðartíðina í hesum føri, og gav samanumtikið Arbeiðs- og brunaeftirlitinum eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli.

Umboðsmaðurin tók til eftirtektar frágreiðingina frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, at stovnurin hevur bøtt um sínar innanhýsis arbeiðsgongdir, soleiðis at støður sum hesar framyvir ikki skulu koma fyri í málum um innlit.

MÁL NR. 25/13894

## Trupulleiki við leysum seyði inni í bygd

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um, at seyður gekk leysur í Sumbiar kommunu alt árið, hóast hann skuldi verið av bønum 15. mai.

Sambært Hagalógini hevur seyður bitsrætt innangarðs á bønum í tíðarbilinum millum 25. oktober og 14. mai, og klagarin helt, at Sumbiar kommuna ikki gjørdi nokk fyri at loysa trupulleikan eftir 14. mai.

Leysgangandi djór eru fevnd av Hagalógini og Hegnsýnslógini og teimum kærumøguleikum, sum har eru. Sumbiar kommuna hevði tó gjørt samstarvsavtalu við Føroya Landfúta og harvið átikið sær leysgangandi djór sum eina kommunala uppgávu.

Sambært samstarvsavtaluni skulu borgarar ringja til løgregluna, sum so setti seg í samband við aktingarmannin. Avtalan var galdandi frá 1. juni til 20. oktober á hvørjum ári, hvat seyði viðvíkur.

Klagarin segði seg hava meldað seyð til løgregluna minst 40 ferðir í tíðarskeiðnum frá 15. mai til 16. juni 2025. Kommunan upplýsti, at flestu uppringingar frá løgregluni til aktingarmannin høvdu verið í tíðarskeiðinum áðrenn 1. juni. Løgreglan hevði tó ringt nakrar ferðir til aktingarmannin eftir 1. juni. Sambært kommununi var eingin seyður upptikin summarið 2025, og tað sýntist vera úrslit av eini raðfesting hjá kommununi.

Umboðsmaðurin helt ikki framferðina hjá kommununi summarið 2025 vera nøktandi. Tá ið ein kommuna ger avtalu um upptøku av djórum, almannakunnger mannagongdina og lýsir hana fyri sínum borgarum, tá eigur kommunan, sambært góðum fyrisitingarsiði, at halda seg til avtaluna og raðfesta hareftir. Umboðsmaðurin mælti kommununi til at endurskoða teirra mannagongdir fyri leysgangangandi djór og síðani greitt geva borgarum boð um galdandi mannagongd og reglugerð.

*Dagføring: Sambært heimasíðu teirra, samtykti Sumbiar kommuna á fundi tann 21. september 2025 at siga upp samstarvsavtaluna millum Sumbiar kommunu og Politimeistaran í Føroyum viðvíkjandi leysgangandi djórum.*

**MÁL NR. 25/20038**

## Almannaverkið fekk átalu fyri vantandi svar í sambandi við umlættingartilboð

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við einari klagu um vantandi svar frá Almannaverkinum.
Klagarin hevði sent áheitan til Almannaverkið tann 22. apríl 2025. Áheitanin snúði seg m.a. um eina klagu um vantandi umlættingartilboð til barn klagarans umframt onnur viðurskifti í hesum sambandi.

Talan var um barn, ið sambært klaguni vegna vantandi trivnað ikki hevði verið í einum umlættingartilboði síðani november 2024, men sum framvegis hevði stóran tørv á tilboði um umlætting. Í málinum sást, at Almannaverkið kendi til tørvin hjá barninum og truplu støðuna hjá familjuni.

Hóast klagarin hevði mint Almannaverkið á málið, tók Almannaverkið ikki verulig stig at viðgera áheitan klagarans fyrr enn fyrst í august mánaði 2025 og bjóðaði klagaranum á fund, ið ikki varð hildin fyrr enn seinast í september 2025.

Almannaverkið ásannaði í frágreiðing til umboðsmannin, at málsviðgerðin hjá Almannaverkinum als ikki hevði verið nøktandi.

Umboðsmaðurin vísti á, at almennir myndugleikar hava eina skyldu at svara áheitanum frá borgarum. Skyldan ber í sær, at myndugleikin skal geva viðkomandi eitt veruligt svar. Tað er ikki nøktandi, at myndugleikin ikki svarar. Um myndugleikin metir, at hann ikki fær givið borgaranum eitt nøktandi svar, so eigur myndugleikin at upplýsa borgaran um hetta. Harafturat skal myndugleikin viðgera áheitanina innan fyri rímiliga tíð.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at Almannaverkið hevur eina serliga ráðgevingarskyldu í § 2 í Almannalógini, ið m.a. inniber, at Almannaverkið skal veita skjóta ráðgeving til foreldur at børnum við serligum tørvi.

Umboðsmaðurin helt, at málsviðgerðin hjá Almannaverkinum ikki hevði verið samsvarandi góðum fyrisitingarsiði og heldur ikki samsvarandi ráðgevingarskylduni hjá Almannaverkinum, ið ásett er í Almannalógini.

Umboðsmaðurin helt harafturat, at tilgongdin hjá Almannaverkinum í hesum máli ikki samsvaraði við grein 3 í Barnarættindasáttmálanum og grein 7 í Breksáttmálanum.

Umboðsmaðurin helt tað vera serliga tyngjandi fyri málið, at talan var um eitt barn við tørvi á umlætting, ið Almannaverkið var vitandi um, og at aktivi leikluturin hjá Almannaverkinum og skjótleikin av málsviðgerðini í slíkum føri er ásettur í Almannalógini at vera av serligum týdningi. Umboðsmaðurin helt eisini, at Almannaverkið í framdu málsviðgerðini ikki sýntist at hava havt tað, ið best tænti barninum sum fremsta atlit ella hevði sett tørv barnsins fremst.

Umboðsmaðurin gav samanumtikið Almannaverkinum eina átalu fyri viðgerðina av hesum máli.

*Uppfylging*
*Beint eftir at álit í málinum varð sent myndugleika og klagara, vendi klagari sær tann 5. januar 2026 aftur til umboðsmannin við viðmerkingum. Klagarin upplýsti, at fundurin við Almannaverkið í september 2025 var ein góður fundur, har ætlan varð løgd fyri, hvussu arbeiðast skuldi fyri at fáa barnið aftur í umlætting. Klagarin hevði tó einki hoyrt aftur, og teimum vitandi, var einki gjørt fyri at útinna ætlanirnar. Tey høvdu nú ikki haft umlætting í eitt ár. Klagarin bað tí um at klagan varð uppafturtikin. Umboðsmaðurin gjørdi eina uppfylging til málið og bað Almannaverkið um frágreiðing. Almannaverkið greiddi í skrivi umboðsmanninum frá, at ymsir arbeiðsfundir høvdu verið í Almannaverkinum um umlætting aftaná fundin í september 2025. Avgjørt var at arbeiða fram ímóti at finna annað umlættingartilboð. Nýggi eindarleiðarin hevði nú, tann 9. januar 2026, innkallað klagarin til fund fyri at umrøða møguleikarnir at finna annað umlættingartilboð. Fundurin var tann 22. januar 2026. Sambært klagaranum var gongd komin á málið, og ljóðaðu møguligar loysnir skilagóðar.*

MÁL NR. 25/24863 og 25/27347

## Umhvørvisstovan fekk átalu fyri handfaringina av tveimum málum, har borgarar ikki fingu svar til umsókn og fyrispurningar sínar

Í tíðarskeiðnum 15. september 2025 – 10. oktober 2025 móttók umboðsmaðurin tvær klagur um málsviðgerðartíðina og vantandi svar frá Umhvørvisstovuni í sambandi við inngangandi teldupostar í tveimum ymiskum málum um ávikavist sundurbýting og samanlegging av matriklum og mvg-afturbering í sambandi við skifti av hitapumpu.

Eina málið hevði verið virkið í tíðarskeiðnum 22. august 2023 – 16. september 2025, uttan at avgerð var tikin, og uttan at klagarin hevði fingið svar til áminningarnar, hann sendi í tíðarskeiðnum 8. februar 2024 – 14. apríl 2025.

Hitt málið hevði verið virkið í tíðarskeiðnum 31. januar 2025 – 16. oktober 2025, uttan at avgerð var tikin, og uttan at klagarin hevði fingið svar til áminningarnar, hann sendi í tíðarskeiðnum 10. juni 2025 – 25. september 2025.

Umhvørvisstovan vísti í eina málinum á, at langa málsviðgerðartíðin og vantandi svarið skyldaðist broytingini av journalskipanin í januar 2024, sum hevði við sær, at mál, ið ikki vóru endað, skuldu upprættast av nýggjum, og at málsviðgeri av misgáum ikki var settur á hesi mál. Umhvørvisstovan greiddi umboðsmanninum frá, at tey nú høvdu tryggjað sær, at málsviðgeri nú er knýttur at øllum málum, og at mál klagarans var sent í hoyring, og at svar væntaðist í oktober 2025.

Umhvørvisstovan vísti í hinum málinum á, at langa málsviðgerðartíðin og vantandi svarið skyldaðist, at málið var dottið niðurímillum.

Í eina málinum var skjalføringin heldur ikki nøktandi.

Umboðsmaðurin gav samanumtikið Umhvørvisstovuni eina átalu fyri handfaringina av teimum báðum málunum, herundir fyri ikki innan rímiliga tíð at hava fylgt upp í málunum og svarað borgarunum, umframt ikki nøktandi skjalføring.

# 5 Frágreiðingar

Umboðsmaðurin kann taka eitt mál upp av egnum ávum og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av sínum virkisøki, og hann hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Umboðsmaðurin kann kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum ikki beinleiðis er klagað um, men sum hann ynskir at kanna nærri.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur kannað og skrivað eina frágreiðing um.

**MÁL NR. 24/21799**

## Eftirlitsvitjan á Gerðisgarði í Skálavík

Í 2024 var umboðsmaðurin á eftirlitsvitjanum á tveimum røktarheimum, Láargarði og Eysturoyar ellis- og røktarheimi, sum hava deildir til fólk við demens. Eftirlitsvitjaninar á røktarheimunum vórðu rættaðar móti støðuni hjá persónum við týðandi sálarligum virkistarni, demens, sum búgva á stovni, teirra sjálvsavgerðarrætti og inntrivum, sum tey ikki geva ella hava førleikar at geva samtykki til.

Áðrenn vitjanirnar hevði umboðsmaðurin fund við Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum fyri at kunna seg um, hvussu demensøkið var skipað. Eisini var fundur við Alzheimerfelagið fyri at fáa kunning um, hvat felagið hevði at viðmerkja um støðuna hjá persónum við demens, sum búgva á stovni.

Eftirlitsvitjaninar tóku m.a. útgangsstøði í hesum lógum:
- Eldralógini, lóg nr. 19 frá 7 apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
- Tvingilslógini, lóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin
- Verjumálslógini, anordning nr. 397 frá 20. apríl 2021 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven
- Lógini um framtíðarfulltrú, lóg nr. 157 frá 10. desember 2021 um framtíðarfulltrú

Á vitjanunum legði umboðsmaðurin harumframt dent á at lýsa gerandisdagin hjá búfólkunum. Í hesum sambandi vórðu m.a. hesi viðurskifti umrødd:
- dagligdagin á deildini, m.a. tiltøk, ítriv og o.a. fyri virkni, trivna og umsorgan
- sambond (relatiónir) og samskifti við tey avvarðandi

- sjálvsavgerðarrættur, samtykki, verjumál, framtíðarfulltrú og fíggjarviðurskifti
- trygd, tvingsil og onnur inntriv, valdsnýtsla v.m.

Áðrenn vitjanina vórðu búfólk og teirra avvarðandi kunnaði um, at umboðsmaðurin kom á eftirlitsvitjan, og at tey, sum ynsktu tað, høvdu møguleika at tosa við umboðsmannin.

Eftirlitsvitjaninar vórðu skipaðar soleiðis, at byrjað varð við einum fundi við leiðsluna og umboð fyri starvsfólkini. Eftir fundin varð víst runt á stovninum. Síðani tosaði umboðsmaðurin við búfólk, avvarðandi og starvsfólk, sum ynsktu samrøðu við umboðsmannin. At enda var samrøða við leiðsluna, har tikið varð samanum dagin.

Sum framhald av hesum var umboðsmaðurin eisini á eftirlitsvitjan á Gerðisgarði í Skálavík. Gerðisgarður í Skálavík er kommunalur bústovnur/røktarheim við 7 búplássum ætlaði borgarum við demens og fevndur av Eldralógini.

Eftirlitið á Gerðisgarði í Skálavík var framt 19. nov. 2024 og frágreiðingin frá hesi eftirlitsvitjan var liðug 26. februar 2025. Hendan frágreiðing er tí við í ársfrágreiðingini fyri 2025, meðan frágreiðingarnar frá eftirlitsvitjanunum á Láargarði og Runavíkar ellis- og røktarheimi eru í ársfrágreiðingini fyri 2024.

Umboðsmaðurin hevur gjørt frágreiðing frá eftirlitsvitjanini, og Økistænastan í Sandoyar Sýslu hevur fingið høvi at gera viðmerkingar til frágreiðingina.
Tá frágreiðingin var liðug, var hon send hesum myndugleikum: Demensklinikkini, Alzheimerfelagnum, landsstýriskvinnuni í almannamálum (Eldralógin), landsstýrismanninum í lógarmálum (Tvingsilslógin), landsstýriskvinnuni í heilsumálum (kommunulæknaskipanin) og Løgtinginum.

Samanumtikið var tað fatanin hjá umboðsmanninum, at talan var um bústovn, ið hevði rímiliga góðar karmar til sítt virksemi, og at tænastan og umsorganin varð veitt við denti á, at talan var um búfólk, sum hava demens av ymiskum slagi, at halda tey virkin eftir evni, og at geva teimum innihaldsríkar dagar.

Viðurskifti, sum umboðsmaðurin hevði viðmerkingar og tilmæli til, greiddi stovnurin beinanvegin eftir eftirlitsvitjanina.

Frágreiðingin er grundarlag undir samandráttinum, sum kann lesast í fylgiskjali 1, ( sum liggur á heimasíðu umboðsmansins)  har tikið verður samanum frá vitjanini, og hvørji tilmæli umboðsmaðurin hevur givið.

*Her er stutt samanskriving av viðmerkingum og tilmælum frá umboðsmanninum:*

**Samanumtikið og tilmæli**
Á eftirlitsvitjanini sýndist Gerðisgarður sum ein bústovnur við hóskiligum umstøðum til tey 7 fólkini, sum búðu har. Gerðisgarður var væl viðlíkahildin innan, men trongdi til ábøtur uttan. Ætlan var løgd fyri neyðugu umvælingarnar uttandura. Á Gerðisgarði

høvdu tey lagt seg eftir, at hava Gerðisgarð so heimligan sum gjørligt, og í sambandi við innrætting og prýðing av stovninum, var atlit tikið at kendum ráðum innan demensvinarliga innrætting.

Við útgangsstøði í hesum var tað samanumtikið fatanin hjá umboðsmanninum, at talan var um ein stovn, ið hevði rímiliga góðar karmar til sítt virksemi. Eisini var tað fatanin hjá umboðsmanninum, at stovnurin hevði ein starvsfólkahóp við neyðugari fakligheit at taka sær av búfólkunum á Gerðisgarði. Arbeiðið tykist væl skipað við stórum denti løgdum á, at talan var um búfólk, sum høvdu demens av ymiskum slagi, at halda tey virkin eftir evni, eins og at geva teimum innihaldsríkar dagar.

Grundað á samrøðuna við leiðsluna í Økistænastuni fyri Sandoyar Sýslu og leiðsluna fyri Gerðisgarð og skjølini, ið umboðsmaðurin hevði fingið útvegað frá stovninum, hevði umboðsmaðurin soljóðandi viðmerkingar og tilmæli skipað í punktum, ið vísa til brot í frágreiðingini:

**Samstarvsráð**

Undir vitjanini varð upplýst, at einki samstarvsráð var skipað. Vísandi til at tað, sambært § 15 í Eldralógini, er eitt lógarkrav, at velja eitt samstarvsráð á hvørjum røktarheimi, heitti umboðsmaðurin í fyribilsfrágreiðing síni á leiðsluna fyri Gerðisgarð um at velja og skipa eitt samstarvsráð fyri stovnin. Tann 21. januar 2025 fekk umboðsmaðurin kunning um, at samstarvsráð var skipað.

Við tað, at tilmælið um at skipa samstarvsráð var tikið til eftirtektar, hevði umboðsmaðurin ikki meira at viðmerkja til hesi viðurskifti.

**Trygd, møguligur harðskapur**

Í sambandi við umrøðu av spurninginum um harðskap á stovninum, vísti umboðsmaðurin á, at verbalar hóttanir eisini kunnu fatast sum harðskapur, og fyri trygdina og trivnaðin hjá starvsfólkum var neyðugt at hava fokus á slíkar støður og skráseta tær, um farið varð út um mark.

Í fyribilsfrágreiðingini mælti umboðsmaðurin Gerðisgarði til at gera skrivliga mannagongd fyri, hvussu harðskapstilburðir skuldi handfarast og skrásetast.

Tann 21. januar 2025 fekk umboðsmaðurin kunning um, at mannagongd nú var gjørd viðvíkjandi harðskapi og hóttanum. Mannagongdin var løgd inn í teirra kunningarskipan, og starvsfólk hava fingið kunning.

Umboðsmaðurin tók til eftirtektar, at Gerðisgarður hevði gjørt skrivliga mannagongd fyri, hvussu harðskapur og hóttanir skuldu handfarast og skrásetast.

**Trygd, tvingsil**

Á Økistænastuni í Sandoyar Sýslu høvdu tey kunnað seg um Tvingsilslógina. Í tveimum førum høvdu tey søkt Kærustovnin um góðkenning til tvingsilsinntriv yvirfyri búfólkum á Gerðisgarði. Umsóknirnar vórðu báðar góðkendar. Frá Økistænastuni varð viðmerkt, at

tað var sera arbeiðskrevjandi at gera slíkar umsóknir.
Gerðisgarður sýndist sostatt at arbeiða samsvarandi lógini um tvingsil. Umboðsmaðurin hevði tí ikki meira at viðmerkja til hesi viðurskifti.

**Bygningurin**
Gerðisgarður í Skálavík varð bygdur í 1990, men ikki tikin fult í nýtslu fyrr enn í 1998. Gerðisgarður sýndist sum væl viðlíkahildin innan, meðan uttan var stovnurin tó ikki so væl viðlíkahildin. Sambært støðulýsing, gjørd í januar 2024, sum umboðsmaðurin fekk avrit av, var tíðin komin til, at bæði vindeygu og klædningur máttu skiftast, og bøtast má um grundina.

Umboðsmaðurin tók til eftirtektar, at ætlan var løgd fyri við tær neyðugu umvælingarnar uttandura, sum vóru nevndar í støðulýsing frá januar 2024, og at miðað varð ímóti, at hesar ábøtur verða framdar innan 1 til 3 ár.

MÁL NR. 25/07621

## Eftirlitsvitjan á Skúlanum á Trøðni

Sum liður í virksemi umboðsmansins á barnaøkinum gjørdi Løgtingsins umboðsmaður í mars 2025 av at fremja eina eftirlitsvitjan á Skúlanum á Trøðni, ið er ein serskúli, sum sambært serskúlalógini undirvísir næmingum, sum ikki kunnu fáa nøktandi undirvísing í nærumhvørvinum.

Áðrenn eftirlitsvitjanina hevði umboðsmaðurin havt fund við serfrøðing í sernámsfrøði og við “Børnekontoret” hjá Folketingets Ombudsmand. Endamálið við hesum fundum var, at umboðsmaðurin fekk kunning um viðurskifti, sum vanliga gera seg galdandi hjá teimum børnum, ið hava tørv á serskúlaundirvísing, og um møgulig serlig viðurskifti, sum umboðsmaðurin skuldi hava fokus á.

Tann 26. mai 2025 vitjaði umboðsmaðurin skúlan.

Eftirlitsvitjanirnar tóku m.a. útgangsstøði í hesari lóggávu:
- Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla
- Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan
- Bekendtgørelse nr. 6 af 16. januar 1992 om FN-konvention af 20. november 1989 om Barnets Rettigheder (Barnarættindasáttmálin)
- Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2009 om FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap (Breksáttmálin)

Fokus við vitjanini vóru næmingarnir, ið ganga á skúlanum og teirra viðurskifti, undir hesum viðurskifti kring undirvísing, sernámsfrøðilig viðurskifti, tvingsil og fysisku karmarnir.



Í sambandi við eftirlitsvitjanina varð eitt skriv sent til skúlan, har umboðsmaðurin kunnaði tey avvarðandi um vitjanina og um møguleikan hjá teimum at fáa eina samrøðu ella samskifta við umboðsmannin áðrenn eftirlitsvitjanina.

Eisini varð kunnað um, at starvsfólk høvdu høvi at tosa við umboðsmannin, um tørvar var á tí.

Eftirlitsvitjanin vardi í umleið fimm tímar og byrjaði við fundi við leiðsluna, umframt eitt lyklastarvsfólk á skúlanum. Síðani varð skipað fyri einari rundvísing. Umboðsmaðurin fekk eisini høvi at hitta nakrar av næmingunum, ið vóru í skúla hendan dagin.

At enda var ein fundur við leiðsluna, har tikið varð saman um, og viðurskifti av týdningi vórðu umrødd.

Umboðsmaðurin hevur gjørt frágreiðing frá eftirlitsvitjanini.

Skúlin á Trøðni og Barna- og útbúgvingarmálaráðið hava fingið høvi at gera viðmerkingar til frágreiðingina.

Nú frágreiðingin er liðug, er hon send nevndu myndugleikum og Løgtinginum.

Frágreiðingin er grundarlag undir samandráttinum, ið kann lesast í fylgiskjalinum har tikið verður samanum frá vitjanini, og hvørjar viðmerkingar og tilmæli umboðsmaðurin hevur gjørt.

*Samandráttur av teimum mest týðandi viðmerkingunum og tilmælunum frá umboðsmanninum*

**Skúlaumhvørvið**
Áðrenn eftirlitsvitjanina høvdu avvarðandi greitt frá um munandi afturljóð í ávísum støðum á Skúlanum á Trøðni, m.a. felagsøkinum, har nógvir næmingar savnast. Undir eftirlitsvitjanini kundi umboðsmaðurin sanna, at talan var um eitt munandi afturljóð, og leiðslan viðurkendi, at talan var um eitt munandi afturljóð, ið sambært leiðsluni eisini hevði sína orsøk í aldrinum av bygninginum.

Umboðsmaðurin heitti á Skúlan á Trøðni um beinanvegin at taka stig til at kanna ljóðviðurskiftini í skúlanum og gera eina ætlan um, hvussu hesi viðurskifti kundu betrast.

Umboðsmaðurin vísti á, at skúlin hýsir eitt nú næmingum, ið eru ljóðviðkvæmir og verða ávirkaðir neiligt av vánaligum ljóðviðurskiftum. Ljóðviðurskifti eiga ikki at verða ein forðing fyri, at næmingar fáa luttikið í felagstiltøkum í einum skúla. At talan er um ein serskúla, ger støðuna bara enn meiri átroðkandi.

**Undirvísing og læriætlan**
Sambært § 5 í serskúlalógini skal undirvísingin á Skúlanum á Trøðni taka støði í einari næmingalagaðari læriætlan.

Sambært viðmerkingunum til § 5 er ein læriætlan eitt formligt skjal, sum skal skipast soleiðis, at foreldrini fáa eina meting av støðu barnsins, hvussu gongdin hevur verið farna hálva árið, undirvísingartiltøk fyri framman og mál fyri undirvísingina komandi hálva árið. Læriætlanin skal vera eitt amboð hjá foreldrum og lærarum.

Umboðsmaðurin fekk eftir egnum ynski útflýggjað søguligar læruætlanir fyri fimm útvaldar næmingar, trý tey seinastu árini, soleiðis at læriætlanirnar fyri hesar næmingar kundu samanberast yvir tíð.

Til tess at fáa eina fakliga meting av hesum læriætlanum, fekk umboðsmaðurin ein serfrøðing í sernámsfrøði at gera eina samanberandi greining av teimum.

Niðurstøðan av greiningini var tann, at læriætlanirnar vóru misjavnar. Summar vóru miðvísar, greitt orðaðar og stuðlaðu ítøkiligari menning, meðan aðrar tóktust óbroyttar, óítøkiligar og vístu ikki menning frá ári til ár.

Vísandi til hesa greining og viðmerkingarnar til § 5 heitti umboðsmaðurin á Skúlan á Trøðni um skjótast gjørligt at skipa fyri einari fakligari eftirmeting av næmingalagaðu læriætlanunum. Umboðsmaðurin metti, at tað hevði stóran týdning, at læriætlanirnar vóru greiðar og ítøkiligar og viðgjørdu førleikar og menning hjá næmingunum.

**Flutningur**
Bæði leiðslan og avvarðandi høvdu víst á, at flutningur kundi vera ein avbjóðing fyri summi, serliga um talan var um flutning frá Skúlanum á Trøðni til frítíðartilboð, ið vóru uttanfyri Tórshavnar kommunu, umframt støður við brádliga íkomnum flutningstørvi.

Umboðsmaðurin hevur fyrr í aðrari frágreiðing frá einari eftirlitsvitjan (LUM 23/18132) viðgjørt eina almenna avbjóðing við flutningi av næmingum og børnum, ið bera brek, tá hesi nýta tænastur hjá m.a. Almannaverkinum.

Umboðsmaðurin vísti á, at lóggávan á økinum er ymisk, alt eftir innan hvønn geira flutningstænastan verður veitt.

Fyri flutning av næmingum millum heim og skúla er tað ásett í fólkaskúlalógini, at avvarðandi kommuna hevur skyldu at skipa flutningstænastu millum heim og skúla. Skyldan fevnir eisini um næmingar, ið bera brek. Hóast tað er ein skylda, so er tað ikki ásett, hvussu flutningurin av børnum, ið bera brek, verður fyriskipaður, ella hvørji krøv verða sett til tænastuna.

Fyri flutning av næmingum frá Skúlanum á Trøðni til frítíðartilboð hjá kommununum og Almannaverkinum er møguleiki at fáa flutningstænastu gjøgnum Serflutningsskipan Landsins.

Serflutningsskipan Landsins er ein kommunal tænasta, ið er skipað sambært reglugerð, og verður fíggjað ávikavist av landskassanum, avvarðandi kommunu og av brúkarunum. Endamálið við skipanini er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru so mikið tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, ella í avmarkaða tíð vegna

sjúku ella skaða hava henda tørv. Almanna- og mentamálaráðið hevur upplýst fyri umboðsmanninum, at Serflutningskipan Landsins einans virkar í Tórshavnar kommunu og í Klaksvíkar kommunu og ikki virkar tvørtur um kommunumark.

Fyri flutning av næmingum frá Skúlanum á Trøðni til frítíðartilboð og aðrar tænastur hjá Almannaverkinum er heimild fyri flutningstænastu í § 43 í Almannalógini.

Almanna- og mentamálaráðið hevði tó greitt umboðsmanninum frá, at flutningstænasta sambært § 43 í Almannalógini ikki var sett í verk orsakað av, at játtan ikki var sett av til endamálið.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at bæði Breksáttmálin og Barnarættindasáttmálin viðgera evnið flutning av børnum, ið bera brek, og vísa á, at vantandi flutningsmøguleikar hjá børnum, ið bera brek, kann elva til, at hesi børn verða útihýst frá útbúgvingarskipanum og øðrum viðkomandi tænastum og tískil eru fyri mismuni í mun til teirra javnlíkar. Báðir sáttmálar tala fyri, at slíkar forðingar eiga at verða beindar av vegnum við inklusjón fyri eyga.

Umboðsmaðurin mælti Barna- og útbúgvingarmálaráðnum til, at ráðið tók stig til at fáa sett í verk greiðar reglur og mannagongdir um flutningstænastu fyri børn, ið bera brek. Umboðsmaðurin metti, at talan átti at vera um eina landsfevnandi flutningstænastu, ið tók støði í bestu loysn fyri Føroya børn, og at henda loysn slóðaði fyri, at tað ongantíð var ivi um ella tilvildarligt, hvørja flutningstænastu børnini fingu, og á hvørjum støði hon varð veitt, í mun til hvar í landinum tey búðu.

Umboðsmaðurin mælti Almanna- og mentamálaráðnum til at skipa fyri, at Serflutnings-skipan Landsins varð endurskoðað, við tí í huga, at skipanin ikki var landsfevnandi og ikki virkaði tvørtur um kommunumørk.

Umboðsmaðurin mælti eisini Almanna- og mentamálaráðnum til skjótast gjørligt at taka støðu til, um heimildin fyri flutningstænastu skuldi setast í verk sambært § 43, soleiðis, sum ásetingin var orðað nú, ella um okkurt annað skal setast í staðin. At § 43 í fleiri ár hevði veitt rættindi, ið í roynd og veru ikki góvu nakran rætt, var sambært umboðsmanninum ikki ein haldgóð støða og ei heldur nøktandi fyri tey børn, ið hava tørv á flutningstænastu.

*Uppfylging*
*Eitt av tilmælunum frá eftirlitsvitjanini var beinanvegin at taka stig til at kanna ringu ljóðviðurskiftini og gera eina ætlan um, hvussu tey kundu betrast.*
*Í sambandi við viðgerð av fíggjarlógini fyri 2026 var samtykt at hækka játtanina til umvæling av almennum bygningum við 1,2 mió. kr. til at bøta um ljóðligu viðurskiftini inni í Skúlanum á Trøðni, eins og raðfestar vórðu 1,2 mió. kr. til endamálið av verandi játtan á undirkontoini. Víst varð til frágreiðing frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum við eini meting frá Landsverk og tilmæli umboðsmansins. Harumframt varð fyrst í 2026 søkt eftir varastjóra til skúlan, sum skuldi vera við at mynda skúlan saman við stjóranum og saman við stjóranum standa á odda fyri fakligu og námsfrøðiligu menningini av skúlanum.*



MÁL NR. 25/10570

# Álit um framferðina hjá Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í nýtslu í apríl 2025

Umboðsmaðurin tók upp mál av egnum ávum um nýggju ferðaseðlaskipanina hjá Strandfaraskipum Landsins. Serliga varð hugt at heimildini fyri, at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið meldaðu seg í skipanina og keyptu talgilt.

Tann 31. mars 2025 lýsti Strandfaraskip Landsins við broyting av prísbygnaði og dagføring av ferðaseðlaprísum, sum innibar at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið skrásettu seg í skipanina og keyptu talgilt. Umboðsmaðurin metti skipanina vera ivasama, bæði viðvíkjandi heimild til at krevja talgilda luttøku og viðvíkjandi tí muni, sum skuldi gerast á ferðaseðlaprísi, um borgarar ikki nýttu talgildu loysnina.

Strandfaraskip Landsins hevur til uppgávu at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Hetta er bundin uppgáva, sum skal røkjast.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnu- og samferðslumálum hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins og heimild at geva tænastuboð. Í hesum má metast at liggja bæði heimild og skylda hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum at tryggja sær, at flutningsskyldan verður røkt á lógligum grundarlagi.

Umboðsmaðurin setti spurningar til Strandfaraskip Landsins og síðani til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um málið. Hvørgin av myndugleikunum kundi vísa á heimild fyri umrøddu broyting.

Umboðsmaðurin metir, at myndugleikar ikki, uttan ítøkiliga lógarheimild, kunnu krevja, at borgarar melda seg í ávísa talgilda skipan. Tað var tí als ikki nøktandi, at Strandfaraskip Landsins setti slíka prísskipan í verk uttan at hava vissað sær, at neyðug heimild var til staðar. Samstundis var tað als ikki nøktandi, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið ikki hevði sett seg inn í skipanina og tryggja sær, at hon var innan lógligu karmarnar. Tað er av stórum týdningi fyri tryggleika og rættin til líkaviðferð hjá borgarum, at slíkar talgildar skipanir, sum hava stóra ávirkan á bólkar av borgarum, ikki verða settar í verk uttan umhugsni og vissu fyri heimild.

Umboðsmaðurin gav tí bæði Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum eina álvarsliga átalu fyri framferðina í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í brúk í apríl 2025. Samsvarandi § 10 í umboðsmanslógini verður send fráboðan um málið til Formansskap Løgtingsins, løgmann og landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum.

*Uppfylging*

*Undir viðgerðini av málinum boðaði ráðið frá, at tað hevði heitt á Strandfaraskip Landsins um at broyta mannagongdir í sambandi við keyp av ferðaseðlum. Munur varð nú ikki gjørdur á teimum ferðandi, og í prísinum tey fingu, óansæð um tey keyptu ferðaseðilin frammanundan umvegis talgildu bíleggingarskipanina ella á staðnum, áðrenn farið varð umborð á skipið. Almenn fráboðan um hetta kom frá Strandfaraskipum Landsins tann 17. september 2025.*

*Tann 22 januar 2026 kunnaði Strandfaraskip Landsins alment um, at endurgjald fór at vera veitt til tey, sum í tíðarskeiðnum høvdu goldið hægri prís fyri ferðaseðil, enn heimilað var.*



# 6 Avvístar klagur

Orsøkin til, at umboðsmaðurin ikki viðger eina klagu, kann vera av formligum slag, so sum at klagan kemur ov seint, ella at ovasti myndugleiki á økinum ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum. Flestu klagur verða tó avvístar ella ikki viðgjørdar, tí umboðsmaðurin ikki metir seg hava nakað grundarlag fyri at gera meira við klaguna.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur valt at avvísa av ymiskum orsøkum.

**Umboðsmaðurin kann einans viðgera mál, sum eru viðgjørd av myndugleikum ella stovnum, sum hoyra til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum (Umboðsmanslógin § 4, stk. 1)**

MÁL NR. 25/05024

## Posta

Ein borgari klagaði um, at Posta sjálvt vildi tollavgreiða postsendingar, ið høvdu virði oman fyri 300 kr. Fyri hetta tók Posta ómaksgjald.
Posta er ikki at rokna sum ein partur av almennu føroysku fyrisitingini, og umboðsmaðurin avvísti tí klaguna. Umboðsmaðurin bað borgaran umhugsa at venda sær til TAKS ella Posteftirlitið við málinum.

MÁL NR. 25/13368

## Nevndin í áhugafelag

Ein borgari klagaði um avgerðir og framferðarhátt hjá nevndini í einum áhugafelag. Áhugafelagið var ikki at rokna sum ein partur av almennu føroysku fyrisitingini, men var harafturímóti eitt áhuga- og sjúklingafelag, og umboðsmaðurin kundi tí ikki viðgera klaguna um nevndina.

MÁL NR. 25/14556

## Landsstýrið

MEGD klagaði um, at landsstýrið legði lógaruppskot fyri tingið uttan at avleiðingagreina ella sendi uppskotini til ummælis.

Sambært § 4, stk. 5 í umboðsmanslógini fevnir virksemi umboðsmansins ikki um ríkismyndugleikar, løgtingið og stovnar undir løgtinginum.

Umboðsmaðurin metti, at avleiðingagreining og ummæli av lógaruppskotum í sambandi við lógarfyrireiking eru týdningarmiklir tættir í at tryggja, at landsins lógir samsvara við ásetingarnar í galdandi lóggávu og altjóða sáttmálum, eitt nú Brekrættindasáttmálanum og Barnarættindasáttmálanum.

Lóggávuvaldið liggur hjá Føroya løgtingi, og lógaruppskot verða gjøgnumgingin í umsiting løgtingsins, løgfrøðisliga og málsliga, eftir at løgtingið hevur móttikið lógaruppskot.

Løgtingið viðgerð síðani lógaruppskot sambært tingskipanini, sum eitt nú hevur ásetingar um innihald av løgtingslógaruppskotum og mannagongd. Føroya løgting eigur síðani endaligu avgerðina um, hvørt lógaruppskot skulu samtykkjast.

Umboðsmaðurin metti tað tí ikki sambæriligt við leiklut umboðsmansins at viðgera lógarfyrireikandi arbeiðið á brekøkinum.

**Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað. Klagarin skal navngeva seg (Umboðsmanslógin § 6, stk. 2)**

MÁL NR. 24/28632

## Mótmæli um útstykking í Runavíkar kommunu

Borgari klagaði í november 2024 um vantandi svar frá Runavíkar kommunu til eitt mótmæli um ætlaða útstykking í Skálafirði. Eftir umbøn sendi Runavíkar kommuna umboðsmanninum frágreiðing og viðkomandi skjøl um málið.

Av samskiftinum við Runavíkar kommunu og frágreiðing teirra var greitt, at kommunan fekk mótmæli frá klagara og øðrum um ætlaðu útstykkingina í juni 2021. Sambært skjølunum, ið umboðsmaðurin fekk frá kommununi, hevði kommunan sent tvær móttøkuváttanir í málinum, men ongin viðgerð sást hava verið av málinum.

Klagarin greiddi frá, at hann hevði frætt, at ætlanin varð slept, men eftirfylgjandi skjøl sýndu, at ætlanin hevði hildið fram og var nú um at vera framd.

Sambært skjølunum snúði klagan seg um vantandi svar til eitt mótmæli latið kommununi í juni 2021. Tá hetta var meira enn eitt ár frammanundan klaguni til umboðsmannin, og klagarin ikki sýntist at hava vent sær aftur til kommununa við áminning um viðurskiftini, avvísti umboðsmaðurin klaguna.

**MÁL NR. 25/29800 og 25/29799**

## Vantandi fundarfrágreiðing hjá Strandfaraskip Landsins og Suðuroyar Sjúkrahús

Kringvarp Føroya  hevði søkt um alment innlit í frágreiðing frá einum fundi, sum hevði verið millum leiðsluna á Strandferðsluni og leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi og eitt av teirra starvsfólkum. Fundurin svar í sambandi við mynd av gloppandi hekkuportri á avloysaraskipinum Prince og var hildin í 2019 á høvuðsskrivstovuni hjá Strandfaraskipum Landsins.

Hvørki Strandfaraskip Landsins ella Suðuroyar Sjúkrahús høvdu skrásett nakað skjal ella fundarfrágreiðing frá fundinum.

Hóast sjálvt innlitsmálið var aktuelt, so vóru viðurskiftini viðvíkjandi notatskyldu og skjalfesting so mikið gomul, at umboðsmaðurin ikki viðgjørdi tey.

Umboðsmaðurin minti tó bæði Strandfaraskip Landsins og Suðuroyar Sjúkrahús á, at góður fyrisitingarsiður áleggur einum myndugleika at skriva upp málsviðgerðarstig, sum hava týdning fyri mál, sjálvt um talan ikki mátti verið um eitt avgerðarmál eftir fyrisitingarlógini.

**MÁL NR. 25/31146**

## Almenn hoyring um byggisamtykt í Sørvágs kommunu

Ein advokatur klagaði vegna borgara um, at Sørvágs kommuna hevði gjørt útstykkingar, ið klagari metti vera í stríð við byggisamtyktina fyri økið, sum var galdandi fram til 2020. Klagari helt, at almenna hoyringin, sum varð framd í sambandi við broytingina av byggisamtyktini var ófullfíggjað.

Sørvágs kommuna upplýsti, at byggisamtyktin varð broytt í 2020 eftir vanligum mannagongdum og hevði ligið frammi til viðmerkingar í 2020. Tær útstykkingar, sum nú vóru gjørdar, vóru í samsvari við nýggju byggisamtyktina. Umboðsmaðurin avvísti klaguna um broyttu byggisamtyktina vísandi til 1 ára freistina.

**Hægsti myndugleiki á økinum skal hava tikið avgerð í málinum, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu um eitt mál (Umboðsmanslógin § 6, stk. 3)**

MÁL NR. 25/00666

## Klaga frá barni um samveruviðurskiftir

Umboðsmaðurin fekk eina klagu frá einum barni um samveruviðurskiftini við annað av foreldrunum.
Umboðsmaðurin sendi klaguna til ummælis hjá Familjufyrisitingini.

Familjufyrisitingin boðaði umboðsmanninum frá, at Familjufyrisitingin hevði tikið eina avgerð um samveru viðvíkjandi hesum barni, ið klagað hevði til umboðsmannin. Familjufyrisitingin greiddi eisini frá, at avgerðin varð kærd til Føroya Kærustovn.

Umboðsmaðurin boðaði bæði barninum og foreldrunum frá, í hvør sínum skrivi, at umboðsmaðurin ikki gjørdi meira við klaguna í løtuni. Umboðsmaðurin kundi ikki viðgera eina klagu um avgerðina hjá Familjufyrisitingini, fyrr enn Føroya Kærustovnur hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

MÁL NR. 25/06419

## Drál frá Almannaverkinum

Borgari klagaði fyrst í mars 2025 um, at Almannaverkið drálaði við at avgreiða hansara umsókn um nýggjan avlamisbuss.

Sambært frágreiðing, sum Almannaverkið sendi umboðsmanninum tann 11. mars 2025, vóru tvær avgerðir tiknar í februar 2025, sum eitt nú viðvíktu avlamisbussinum. Í viðløgdu avgerðunum sást, at klagarin hevði fingið kæruvegleiðing og sambært Almannaverkinum, vóru báðar avgerðirnar seinni kærdar til Føroya Kærustovn.

Umboðsmaðurin vísti á, at hann ikki kundi viðgera klagu um hesar avgerðir, fyrr enn Kærustovnurin hevði tikið endaliga avgerð í málunum.

MÁL NR. 25/09494

## Ferðaseðlaprísir hjá Strandfaraskip Landsins til útisetar

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um Strandfaraskip Landsins og dagførdu ferðaseðlaprísirnar. Klagarin helt, at prísmunur fyri ferðaseðlar til ríkisborgarar, sum ikki búðu í Føroyum, var ikki í samsvar við § 10 í Heimastýrislógini.

Sum meginregla viðgerð umboðsmaðurin ikki viðurskifti, fyrrenn avvarðandi fyrisitingarmyndugleiki hevur haft høvi at viðgera tey.

Viðkomandi hevði ikki vent sær til Strandfaraskip Landsins ella landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, sum hevur yvirskipaða eftirlitið við Strandfaraskipum Landsins.

Umboðsmaðurin viðgjørdi tí ikki klaguna, men sendi hana víðari til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið í samráð við klagaran.

MÁL NR. 25/10499

## Klaga um formannin í Búskaparráðnum og Landsbankastjóran

Borgari klagaði millum annað um, hvussu formaðurin í Búskaparráðnum og landsbankastjórin, høvdu útint síni almennu størv í sambandi við umtalu av verkætlanini um Suðuroyartunnilin, herundir tíðindabræv frá Landsbankanum frá 30. apríl 2025 nevnt “Avbjóðingar í stórum verkætlanum – strategisk misrepresentatión”.

Umboðsmaðurin vísti á, at hann ikki kundi viðgera eina klagu um eina avgerð, fyrr enn hon var kærd til viðkomandi kærumyndugleika, og endalig avgerð varð tikin í málinum. Klagan snúði seg ikki um eina ítøkiliga fyrisitingarliga avgerð, men um hvussu alment starv varð útint, og hvat viðkomandi sum fakpersónur hevði sagt alment um eina verkætlan. Umboðsmaðurin metti tó, at sama mannagongd sum nevnd í § 6, stk. 3 skuldi nýtast, so yvirskipaði myndugleikin fekk høvi at viðgera klaguna fyrst. Hetta eisini hóast Landsbanki Føroya var sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkaði óheftur av politisku skipanini.

Sambært umboðsmanninum merkti hetta, at ein klaga um virksemi hjá landsbankastjóranum og formanninum í Búskaparráðnum í fyrstu syftu mátti sendast myndugleikunum, sum høvdu sett viðkomandi í starv. Landsbankastjórin var settur í starv av nevndini í Landsbankanum, meðan formaðurin í nevndini fyri Landsbankan, sum eisini var formaður í Búskaparráðnum, var settur í starv av landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum.

Harumframt viðmerkti umboðsmaðurin, at ein møgulig viðgerð hjá umboðsmanninum vildi verið avmarkað av, at málið var tengt at fíggjarfrøðiligum metingum, sum ikki eru natúrligur partur av virkseminum hjá Løgtingsins umboðsmanni.

Vísandi til nevndu viðurskifti boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at hann í løtuni ikki viðgjørdi klagurnar um landsbankastjóran og formannin í Búskaparráðnum.

Eftir avtalu við klagaran vóru klagurnar síðani sendar ávikavist nevndini fyri Landsbankan og landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum.

**MÁL NR. 25/14102**

## Klaga um vantandi avgerð frá Føroya Kærustovni

Ein borgari bíðaði eftir avgerð frá Føroya Kærustovni um at fáa stuðul til bil. Borgarin fýltist á, at hóast málið var sent Føroya Kærustovni, bleiv Almannaverkið við at viðgera málið.

Umboðsmaðurin spurdi seg fyri um støðuna í málinum.

Kærustovnurin upplýsti, at avgerðin hjá Almannaverkinum um sýttan stuðul til bil var til viðgerðar hjá teimum. Undir viðgerðini hevði málið verið til viðmerkingar hjá Almannaverkinum. Í hesum sambandi hevði Almannaverkið fingið til vega nýggja heilsuváttan frá kæraranum. Málið var nú liðugt upplýst hjá Kærustovninum, og løgfrøðingur fyrireikaði málið til avgerðar. Málið var sostatt enn undir fyrisitingarligari viðgerð.

Klaga um málið kundi tí ikki viðgerast av umboðsmanninum, fyrr enn Føroya Kærustovnur hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

**MÁL NR. 25/30546**

## Vantandi kæruvegleiðing frá Akstovuni

Ein borgari klagaði um, at Akstovan hevði boðað honum frá, at tey hækkaðu fakturaprísin á innflutta bili hansara. Akstovan góðtók ikki tey skjalprógv borgarin hevði latið inn. Fyri at áseta fakturaprísin tók Akstovan eitt eykagjald á 3.000 kr.

Í løgtingslóg nr. 33 frá 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, við seinni broytingum, er ásett í § 33: "Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina."

Umboðsmaðurin sá ikki, um borgarin hevði fingið kæruvegleiðing við avgerðini um skrásetingargjaldið. Umboðsmaðurin mælti borgaranum til beinanvegin at venda sær til Akstovuna og spyrja eftir kæruvegleiðing, og annars senda kæru sína til Føroya Kærustovn innan nevndu freist.
Umboðsmaðurin fekk ikki viðgjørt klaguna, tí fyrisitingarligur kærumyndugleiki ikki var troyttur.

**Grundarlag er ikki fyri at gera meira við klaguna (Umboðsmanslógin § 6, stk. 4)**

MÁL NR. 25/23338

## Vantandi svar frá Útlendingastovuni

Ein advokatur klagaði tann 1. september vegna Samverk um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Útlendingastovuni í sambandi við eina ósemju um, hvørjum fakfelag ávís starvsfólk kundu vera í. Meginparturin av klaguni viðvíkti viðurskiftum um fakfelagstilknýti, sum umboðsmaðurin ikki viðgjørdi. Umboðsmaðurin vísti tó Útlendingastovuni á skriv frá advokatinum tann 14. mai, sum advokaturin ikki metti vera svarað.

Útlendingastovan sendi umboðsmanninum frágreiðing um málið og vísti á, at hvørki Samverk ella advokaturin høvdu eitt ítøkiligt mál hjá Útlendingastovuni. Útlendingastovan metti, at stovnurin hevði uppfylt sína vegleiðingarskyldu sum almennur myndugleiki, við tað at starvsfólk høvdu vegleitt advokatin og Samverk um, hvussu Útlendingastovan málsviðger mál um uppihalds- og arbeiðsloyvi, og hvørjar metingar tey leggja dent á í hesum sambandi. Vegleiðing var, sambært Útlendingastovuni, farin fram umvegis telefon og teldupost. Útlendingastovan viðurkendi tó, at tey áttu at havt svarað skrivi advokatsins frá 14. mai skrivliga og greitt frá, at tey ikki mettu grundarlag vera fyri framhaldandi samskifti.

Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið, við tað at advokaturin og Samverk ikki vóru partar í ítøkiligum máli, eins og tey høvdu fingið svar og vegleiðing.

MÁL NR. 25/28232

## Klaga um málsviðgerðartíð av umsókn um skúlaflyting

Ein borgari klagaði um framferðarháttin og málsviðgerðartíðina hjá Kvívíkar kommunu í sambandi við umsókn um skúlaflyting frá Kvívíkar kommunu til aðra kommunu í Føroyum.

Eisini var klagarin ónøgdur við, hvussu Kvívíkar skúli hevði handfarið onnur viðurskifti hjá barni klagarans.
Í upplýsingunum í málinum sá umboðsmaðurin, at viðurskiftini lógu meira enn eitt ár frammanundan klaguni til umboðsmannin og tískil fór umboðsmaðurin, vísandi til § 6, stk. 2 í umboðsmanslógini, ikki at viðgera tann partin av klaguni.

Umboðsmaðurin bað Kvívíkar kommunu geva sær eina frágreiðing um viðgerðina av málinum um skúlaflyting.

Eftir at hava lisið frágreiðingina og skjølini frá Kvívíkar kommunu helt umboðsmaðurin, at grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna. Í mun til málsviðgerðartíðina hevði verið støðug gongd frá byrjan til enda, og málið hevði bæði fingið fyrisitingarliga og politiska viðgerð.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at Kvívíkar kommuna hevði boða sær frá, at kommunan nú var farin undir at arbeiða við eini heimildarskipan, soleiðis at avgerðir um skúlaflyting vórðu koyrdar í nevnd ella til avgreiðslu hjá fyrisitingini.

**MÁL NR. 25/29066**

## Klaga um málsviðgerðartíðina av arbeiðsskaðamáli

Ein borgari klagaði um málsviðgerðartíðina hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við eitt arbeiðsskaðamál og ynskti at vita, nær endalig avgerð fór at verða tikin.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiddi frá, at málið bíðaði eftir vegleiðandi útsøgn frá danska stovninum Arbejdsmarkedets erhvervssikring (AES), harumframt hevði tað verið trupult at finna týðara at týða skjøl úr fremmandamáli til danskt, men arbeitt hevði verið við tí.

Umboðsmaðurin avvísti klaguna vísandi til, at málið bíðaði eftir AES, og at tað ikki bar til at geva klagara eina tíðarætlan yvir, nær endalig avgerð fór at verða tikin.
Umboðsmaðurin viðmerkti, at tá talan var um umsókn frá 13. mars 2024, og Almannaverkið hevði fráboðað avgerð upp á umsóknina, tann 18. apríl 2024, var málsviðgerðartíðin somikið stutt, at grundarlag var ikki fyri at halda, at talan var um ov langa viðgerðartíð.
Umboðsmaðurin vísti eisini á, at sambært § 6, stk. 3 kunnu klagur um avgerðir, ið ein møguligur hægri fyrisitingarmyndugleiki kann broyta, ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Í ítøkiliga málinum merkti hetta, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera eina klagu um avgerðina, sum borgarin hevði fingið frá Almannaverkinum, fyrr enn hon var kærd til Kærustovnin, og Kærustovnurin hevði tikið endaliga avgerð í málinum.



# 7 Onnur viðgerð og hjálp til borgarar

Umboðsmaðurin hevur ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Ein klaga verður altíð kannað gjølla, áðrenn avgerð verður tikin, um hon skal avvísast. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ein avvísing av einari klagu kann vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Niðanfyri eru dømir um mál, har grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna, tí gongd var komin á málið, málið var loyst undir klaguviðgerðini ella borgarin fekk hjálp á annan hátt.**

MÁL NR 24/24984

## Vantandi svar frá Tórshavnar kommunu

Borgari klagaði í oktober 2024 um vantandi svar frá Tórshavnar kommunu til eina umbøn um innlit í eitt byggimál.

Tann 20. des. 2024 kunnaði kommunan umboðsmannin um, at kommunan hevði svarað borgaranum.
Í januar 2025 spurdi klagarin, hvat hann skuldi gera, tí kommunan ikki hevði givið honum fult innlit.

Við tað at klagarin hevði fingið svar frá kommununi, greiddi umboðsmaðurin klagaranum frá, at grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna um vantandi svar. Borgarin kundi tó boðað frá, um hann ynskti at klaga um sjálva avgerðina, so rættleikin í avgerðini kundi verða viðgjørdur.

Viðmerkt var, at í so fall fyrihelt umboðsmaðurin sær eisini møguleikan at kanna handfaringina hjá kommununi av málinum. Klagað varð ikki um avgerðina um innlit, og málið varð hareftir endað.

MÁL NR 25/00659

## Klaga frá barni um kaldar brúsur í skúlanum

Eitt barn klagaði beinleiðis til umboðsmannin um at brúsurnar í skúlanum, har barnið var næmingur, vóru ov heitar. Tær høvdu verið ov heitar í langa tíð, uttan at nakað hevði verið gjørt við tað.

Umboðsmaðurin bað skúlan um at geva sær eina frágreiðing um viðurskiftini, ið barnið hevði nevnt.

Skúlin boðaði síðani frá, at skúlavørður skúlans nú hevði lækkað hitan í brúsunum nøkur stig.

Umboðsmaðurin boðaði foreldrunum at barninum og barninum frá, í hvør sínum skrivi, at skúlin nú hevði tikið stig til at loysa trupulleikan, og at umboðsmaðurin tískil ikki gjørdi meira við klaguna.

MÁL NR 25/03005

## Klaga um umstøður á stovni hjá Almannaverkinum

Ein borgari klagaði um ítøkiligar umstøður á einum stovni hjá Almannaverkinum, har barn klagarans búði.
Umboðsmaðurin spurdi Almannaverkið um málið og umstøðurnar á stovnunum. Almannaverkið sendi frágreiðing um mannagongdir teirra á ítøkiliga stovninum. Upplýst var eisini, at fysisku karmarnir á ítøkiliga stovninum ikki vóru nøktandi til tørv barnsins, og hetta var viðvirkandi til, at tað kundi verða ein avbjóðing at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð.

Arbeitt hevði tí verið við at flyta barnið á annan betri hóskandi stovn, og hetta var nú gjørt.

Umboðsmaðurin metti tí, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

MÁL NR 25/03737

## Klaga um ferðaendurgjald frá barnaverndartænastu

Eitt foreldur klagaði um, at Suðuroyar barnaverndartænasta hevði játtað viðtalur til foreldrið og barnið og ferðaendurgjald í tí sambandi. Ferðaendurgjaldið rakk tó ikki til útreiðslurnar og foreldrið mátti leggja út fyrst og fekk ikki endurgjald fyri at ferðast við bili.

Umboðsmaðurin sendi klaguna til Barnaverndartænastuna og bað um frágreiðing.

Skipanin við at endurrinda borgaranum aftaná ferðina, var nýtt sum fastur leistur í slíkum málum, og umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at gera meira við hendan partin av klaguni.

Umboðsmaðurin sá tó, at avgerðin um ferðaendurgjald ikki tók støðu til samlaða ferðatørvin hjá foreldrinum, og heitti tí á Barnaverndartænastuna um at taka tann partin

av málinum uppaftur til viðgerðar. Barnaverndartænastan tók eftir hetta nýggja avgerð og veitti hækkað ferðaendurgjald og gav foreldrinum kæruvegleiðing.

Umboðsmaðurin metti tí ikki grundarlag vera at gera meira við málið.

MÁL NR 25/18531

## Klaga um vantandi eftirlit hjá Búnaðarstovuni

Ein borgari klagaði um vantandi eftirlit hjá Búnaðarstovuni av landsjørð.

Klagari segði seg tvær ferðir seinnu árini hava víst Búnaðarstovuni á, at ein festari skar flag av dyrkaðum lendi, sum ikki toldi at lækkast. Klagarin helt, at eftirlitið hjá Búnaðarstovan ikki var nøktandi.

Búnaðarstovan greiddi frá, at hon fyrisitur landsjørð, sambært Løgtingslóg um landsjørð, og fremur eftirlit, sambært § 5, stk. 2 í somu lóg. Festarin hevur munandi sjálvstøðugar heimildir til at umsita og gagnnýta tilfeingið á festinum viðvíkjandi grøði, húsdjórum og lunnindum v. m., so leingi hesi ikki verða misrøkt ella illa viðfarin.

Av frágreiðingini og skjølunum sást, at Búnaðarstovan hevði fyrihildið seg til viðurskiftini í klaguni og tikið málið upp yvirfyri festara. Búnaðarstovan hevði verið á eftirlitsvitjan og var í ferð við at fáa viðurskiftini í rætt lag.

Umboðsmaðurin metti tí, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

MÁL NR 25/24197

## Gjald fyri barnaansing í Klaksvíkar kommunu

Eitt foreldur klagaði um, at Klaksvíkar kommuna hevði kravt fult gjald fyri dagrøkt í juli 2025, hóast ongin ansing var tvær vikur í juli.

Klagan varð send Klaksvíkar kommunu til ummælis.

Kommunan greiddi frá, at talan var um eitt mistak. Á nevndarfundi hjá Trivnaðarnevndini í januar 2024 varð samtykt at umskipa summaransingina í dagrøktini í Klaksvíkar kommunu við at skipa fyri felags ansing í viku 29 og 32 og stongja í viku 30 og 31. Eisini varð mælt til, at foreldragjaldið til dagrøktarskipanina fyri juli mánað varð skert við einari helvt.

Av misgáum varð broytingin í foreldragjaldinum ikki framd, og tí høvdu foreldur av órøttum goldið fyri tvær vikur í juli mánaða 2024 og/ella juli 2025.

Kommunan fór nú at rinda upphæddina aftur til foreldur, sum høvdu goldið ov nógv í juli 2024 og/ella juli 2025.

Til tess at tryggja, at slíkt mistak ikki endurtók seg, fóru samtyktirnar frá fundum í trivnaðarnevndini regluliga at verða gjøgnumgingnar í umsitingini.

Við tað at kommunan hevði tikið stig til at rætta mistakið og til at forða fyri, at slikt mistak hendi aftur, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

MÁL NR 25/24847

## Klaga um treytir fyri at virka í virkisbygningi í Sunda kommunu

Eitt felag klagaði um ófullfíggjað skriv frá Sunda kommunu í sambandi við treytir fyri at virka í einum virkisbygningi.

Umboðsmaðurin bað kommununa um viðmerkingar til klaguna.

Eftir at kommunan hevði sent frágreiðing sína, bað umboðsmaðurin um at fáa skjølini í málinum. Eisini var kommunan biðin um at gera viðmerkingar til, at skrivið sum klagað var um, ikki vísti á lógargrundarlag ella kærumøguleika.

Kommunan svaraði, at tey nú vóru vorðin varug við, at eitt byggimál og eitt leigumál vóru blivin samantvinnað. Tað, sum byrjaði sum eitt byggimál, skuldi av røttum verið eitt eftirlitsmál, sambært byggilógini. Sunda kommuna fór nú at viðgera málini av nýggjum, og skrivið, sum varð sent klagaranum varð tikið aftur. Nýtt skriv fór at verða sent klagaranum við tilvísing til viðkomandi lógarásetingar.

Við tað at kommunan nú hevði tikið skrivið aftur, sum klagað var um, og hevði boðað frá, at málini fóru at verða viðgjørd av nýggjum, metti umboðsmaðurin ikki grundarlag at gera meira við málið.

MÁL NR 25/26900

## Vantandi avgerð frá Vanlukkutryggingarráðnum

Ein borgari klagaði um, at hann ikki hevði fingið avgerð frá Vanlukkutryggingarráðnum í sambandi við ein arbeiðsskaða. Málið hevði verið virkið í 5 ár og bíðaði eftir vegleiðandi útsøgn frá danska stovninum Arbejdsmarkedets erhvervssikring (AES). Arbeiðs- og brunaeftirlitið, sum virkar sum skrivstova fyri Vanlukkutryggingarráðið, hevði biðið tey sjálvi minna AES á málið.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið greiddi umboðsmanninum frá, at málið lá hjá AES til vegleiðandi útsøgn. Eftir at klagað var til umboðsmannin, varð tó skrivað tilmæli í málinum um fyribilsavgerð, sum Vanlukkutryggingarráðið tók undir við. Skjøl vóru send klagara til hoyringar, og fyribilsavgerð kundi sendast í málinum, eftir at hoyringsfreistin var farin.

Harumframt upplýsti Arbeiðs- og brunaeftirlitið, at tey høvdu rykt AES eftir svari. Tað var ikki vanlig mannagongd, at biðja borgarar sjálvir rykkja AES eftir svari. Talan tí var um eina misskiljing.

Umboðsmaðurin metti við støði í hesum ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið.

MÁL NR 25/29591

## Klaga um avgerð at steðga sernámsfrøðiligum tilboði til barn við serligum tørvi

Ein borgari sendi umboðsmanninum klagu um avgerð hjá Tórshavnar kommunu, um at starvsfólk á dagstovninum, har barn klagarans gekk, aftaná ávísa dagfesting ikki longur fóru at útinna sernámsfrøðiligar arbeiðsuppgávur í sambandi við barnið. Ætlanin var, at barn klagarans skuldi flytast í eina einstaklingafyriskipan hjá Almannaverkinum, og at søkt varð eftir fólki til hettar.

Klagan snúði seg um, at dagfestingin, har Tórshavnar kommuna ikki longur sá seg føra fyri at ansa barni klagarans, var ov tepur. Klagarin metti, at stórur vandi var fyri, at einstaklingafyriskipanin ikki var komin uppá pláss innan hesa freist. Hetta fór at elva til, at barn klagarans onga ansing hevði.

Umboðsmaðurin bað Tórshavnar kommunu um eina frágreiðing um viðgerðina av hesum máli.

Tórshavnar kommuna greiddi millum annað umboðsmanninum frá, at kommunan ásannaði, at freistin var sera stutt og at avgerðin var tikin við støði í manglandi starvsfólkaorku. Kommunan greiddi víðari frá, at umsóknir vóru komnar til starvið í einstaklingafyriskipanini, og at kommunan metti seg hava skyldu at bjóða familjuni eitt dagstovnatilboð inntil Almannaverkið formelt tók við einstaklingafyrikipanini.

Umboðsmaðurin boðaði eftir hetta klagaranum frá, at umboðsmaðurin ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klaguna. Hesa fatan bygdi umboðsmaðurin á frágreiðingina frá Tórshavnar kommunu um orsøkina til, at kommunan ikki metti seg kunna veita ansingartilboð framyvir, og at Tórshavnar kommuna tó fór at bjóða eitt ansingartilboð, inntil Almannaverkið formliga tók yvir við einstaklingafyriskipanini.

**Frágreiðing frá myndugleikanum um málið gjørdi, at umboðsmaðurin metti, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við málið.**

MÁL NR 25/26967

## Klaga um skipanina við fylgjara til viðgerðir uttanlands

Borgari klagaði um, at skipanin við fylgjara til viðgerð uttanlands ikki varð umsitin á sama hátt á teimum trimum sjúkrahúsunum.

Umboðsmaðurin bað í hesum sambandi Sjúkrahúsverkið at lata sær frágreiðing um umsitingina av skipanini við sjúklingafylgjara, herundir hvat verður gjørt fyri at tryggja, at skipanin verður umsitin á sama hátt á teimum trimum sjúkrahúsunum. Við tað at klagan nevndi støðuna, tá sjúklingar verða sendir til stráluviðgerð uttanlands, varð eisini biðið um, at frágreiðingin umrøddi ta praksis, ið tey trý sjúkrahúsini hvør í sína lag hava á hesum øki. Biðið varð eisini um hagtøl frá teimum trimum sjúkrahúsunum, sum fyri tíðarskeiðið 1. januar 2025 - 1. oktober 2025 vístu:

- hvussu nógvar sjúklingar tey hava sent til viðgerðar uttanlands
- hvussu nógvir av hesum fingu játtað fylgjara
- hvussu nógvir av hesum fingu noktandi avgerð um fylgjara

Sjúkrahúsverkið lat umboðsmanninum frágreiðing, har greitt varð frá mannagongdunum á teimum trimum sjúkrahúsunum, og at roynt varð at hava mannagongdir v.m. soleiðis, at sjúklingar altíð vóru viðfarnir eins og høvdu eins rættindi. Eisini vóru fastar mannagongdir gjørdar fyri ymisku sjúklingabólkarnar – eitt nú teir sum skuldu til stráluviðgerð uttanlands – so ein meginregla var um, nær fylgjari varð mettur neyðugur í mun til ymisku sjúkustøðurnar. Sum undantak kundi fylgjari eisini játtast, tá serligar umstøður gjørdu seg galdandi. Viðvíkjandi hesum fylgjarum viðmerkti Sjúkrahúsverkið:

“Samanumtikið kann Sjúkrahúsverkið viðmerkja, at eru tað serlig viðurskifti, sum likamligt, sálarligt og sosialt ófullføri, sum kunnu gera, at ein sjúklingur fær játtaðan fylgjara, og ein annar ikki fær, hóast teir hava somu sjúkuørindir. Hetta kunnu vera viðurskifti, sum eru ósjónlig, og sum ein ikki hevur hug at tosa við aðrar sjúklingar um, tá støðurnar verða samanbornar.”

Frágreiðingin innihelt eisini umbidnu hagtøl fyri tíðarskeiði 1. januar 2025 – 1. oktober 2025.

Eftir at hava gjøgnumgingið klaguna við skjølum og frágreiðingina frá Sjúkrahúsverkinum, boðaði umboðsmaðurin frá, at hann helt, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna. Hesa fatan bygdi umboðsmaðurin á, at út frá hagtølunum frá Sjúkrahúsverkinum og frágreiðing teirra var ikki grundarlag fyri at halda, at talan var um tilvildarliga umsiting ella mismun í sambandi við umsitingina av skipanini við sjúklingafylgjarum.

MÁL NR 25/28544

## Klaga um avgerð hjá Almannaverkinum um búpláss

Ein borgari klagaði um, at Almannaverkið hevði strikað eina umsókn um búpláss til mammu klagarans og hevði sagt ósatt um, at ongi búpláss vóru tøk á ávísum stovni í Suðuroy. Klagarin helt, at øll búplássini ikki vóru brúkt.

Almannaverkið greiddi umboðsmanninum frá, at umsóknin ikki var strikað. Onki búpláss var tøkt til mammuna. Tørvurin á umlættingarplássum var størri, enn tað vóru umlættingarpláss. Tí vórðu nøkur av búplássunum nýtt til umlættingarpláss.

Almannaverkið ásannaði tó, at mamma klagarans hevði tørv á búplássi, og fór at fáa regluliga umlætting, til búpláss fór at verða tøkt.

Umboðsmaðurin metti, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.



*„Tá talan er um lóggávu, sum fer at ávirka børn, eiga myndugleikar at umhugsa, hvussu sjónarmiðini hjá børnum verða tikin við.“*



**Hanna Vang**, Løgtingsins og barnanna umboðsmaður

# Barnarættindasáttmálin og lógarfyrireiking

Grein 3 í Barnarættindasáttmálanum hevur høvuðsregluna um, at vaksin skulu gera tað, sum er best fyri børn. Hetta nevni eg hereftir fyri barnsins besta.

Sambært Barnarættindasáttmálanum skal barnsins besta vera eitt grundleggjandi atlit í øllum málum, sum á ein ella annan hátt viðvíkja børnum ella ávirka børn.

Eg havi áður umrøtt skylduna hjá myndugleikum at lýsa barnsins besta í sambandi við ítøkilig mál í greinini "Barnarættindasáttmálin og málsupplýsingarskyldan" frá juli 2024. Í hesi grein fari eg at umrøða týdningin, sum ásetingarnar í grein 3 og grein 12 í Barnarættindasáttmálanum um barnsins besta og barnsins sjónarmið eftir míni meting eiga at hava fyri lógarfyrireiking.

Fyrisitingarlógin er galdandi fyri allar partar av almennu fyrisitingini undir heimastýrinum fyri viðgerðina av málum, har ein fyrisitingarmyndugleiki hevur ella fer at taka avgerð. Hóast lógarfyrireiking ikki er at rokna sum avgerðarvirksemi, so er lógarfyrireiking tó nágreiniliga lýst og skipað í Rundskrivi um lógarsmíð. Rundskrivið er stílað øllum stjórnarráðum og stovnum undir landinum og ásetir, hvussu løgtingslógaruppskot og broytingaruppskot skulu orðast og setast upp. Krøv til innihaldið í viðmerkingum til uppskot verða eisini ásett. Tað er lutvíst við Rundskrivi um lógarsmíð í huga, at greinin er skrivað.

## Barnsins besta og lógarfyrireiking

Endamálið við grein 3 í Barnarættindasáttmálanum er at tryggja áhugamálini hjá børnum í øllum málum, sum á ein ella annan hátt viðvíkja børnum ella ávirka børn. Reglan inniber, at barnsins tørvur skal setast fremst í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum.

Øll, sum taka avgerðir vegna samfelagið, eiga, sambært Barnarættindasáttmálanum, at upplýsa málið og meta um, í hvønn mun børn verða ávirkað av avgerðini. Tær avgerðir, sum verða tiknar, eiga at hava barnsins besta sum eitt grundleggjandi og sera týdningarmikið atlit.

Hendan skyldan at meta um barnsins besta er ikki einans galdandi fyri mál, sum viðvíkja einstøkum børnum, men eisini fyri mál, sum viðvíkja størri og minni bólkum av børnum. Hátturin, sum vit skipa okkara samfelag, hevur eyðsæð ávirkan á børn og ung. Tað er kanska sjónligast, tá talan er um lógir og skipanir, sum beinleiðis seta rammurnar fyri barnalívið, so sum lóggáva um barnavernd, almannaveitingar, skúlagongd, barnagarðar og frítíðarskúlar o.s.fr.. Men eisini aðrar lógir og fyriskipanir, sum í fyrstu syftu ikki tykjast snúgva seg um børn, kunnu fáa týdning og ávirkan á børn.

Ein greinilig lýsing av barnsins besta í sambandi við lógarfyrireiking, kann tí síggjast sum ein týdningarmikil liður í at tryggja, at landsins lógir samsvara við ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum.

Sambært Rundskrivi um lógarsmíð skulu viðmerkingarnar til lógaruppskot greiða frá avleiðingunum av uppskotinum. Eitt nú ásetir punkt 1.2.2.6, at lógaruppskot skulu lýsa avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir:

”Hevur lógaruppskotið avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir t.d. sosialar
avleiðingar ella aðrar avleiðingar? Her verður serliga hugsað um, hvørt almennur stovnur ella tænasta verður uppraðfest ella niðurraðfest, sum rakar ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Hevur lógaruppskotið ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, skal tað verða tilskilað”

Undir hesum broti kunnu børn, sum bólkur ella ávísir bólkar av børnum, helst síggjast sum ein av teimum samfelagsbólkum, sum hugsast skal um.

## Barnsins sjónarmið og lógarfyrireiking

Grein 12 í Barnarættindasáttmálanum er høvuðsreglan um, at børn hava rætt til at hava sína egnu meining, og at tey vaksnu skulu virða hana. Føroyar hava við at taka undir við Barnarættindasáttmálanum átikið sær at viðurkenna rættin hjá børnum at orða síni sjónarmið í málum, sum viðvíkja teimum, ella sum ávirka tey.
Børn, sum eru før fyri at orða síni egnu sjónarmið, hava rætt til at sleppa at greiða frá teimum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið. Henda meginregla um at

sleppa til orðanna má eisini metast at hava týdning, tá ið finnast skal fram til barnsins besta í sambandi við lógarfyrireiking.

Her er punkt. 1.1.10 í Rundskrivinum um lógarsmíð viðkomandi, har millum annað stendur:

"Tað er ógvuliga týdningarmikið, at øll uppskot verða send til ummælis. Hetta so at borgarar, vinnulív, almennir myndugleikar, stovnar o.o. fáa høvi at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um uppskotið. Eisini er tað vanliga so, at tey, sum kenna økið best, sum lóggivið verður um, eru teir borgarar, vinnulív o.o., sum lóggávan hevur til endamáls at ávirka. Uppskot verða send beinleiðis til øll tey, sum stjórnarráðið veit verða ávirkað av uppskotinum. Eisini skulu øll uppskot leggjast alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, har øll hava møguleika at koma við sínum ummæli.."

Sambært rundskrivinum, skulu myndugleikar, sum fyrireika lóggávu, senda uppskot til ummælis.

Eg haldi, at tá talan er um lóggávu, sum fer at ávirka børn, eiga myndugleikar at umhugsa, hvussu sjónarmiðini hjá børnum verða tikin við. Myndugleikin kann til dømis við støði í grein 12 í Barnarættindasáttmálanum royna at fáa til vega sjónarmið hjá børnum til ætlaða lógaruppskotið við at venda sær til børn innan ávirkaða økið, til næmingaráð ella umvegis áhugabólkar, sum umboða tey børn, sum verða ávirkað av uppskotinum.

## Barnarættindasáttmálin og lógarfyrireiking

Barnarættindasáttmálin hevur ásetingar, har limalondini hava átikið sær at tryggja børnum ávís rættindi. Barnarættindasáttmálin er tí eisini viðkomandi fyri myndugleikar í sambandi við lógarfyrireiking.

Sambært Rundskrivi um lógarsmíð punkt. 1.2.2.8, eigur tað í sambandi við lógaruppskot at verða upplýst, hvussu uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið, og hvussu og í hvønn mun Føroyar við lógaruppskotinum halda og menna krøvini, sum eru ásett í millumtjóðasáttmála. Ítøkiliga er síðani ásett í rundskrivinum, at tað í lógaruppskotinum skal lýsast, hvussu lógaruppskotið sampakkar við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.
Barnarættindasáttmálin er ikki beinleiðis nevndur í hesum broti, men umhugsast kann, um hann ikki allíkavæl eigur at verða fastur táttur til umhugsan í sambandi við lógarfyrireiking á sama hátt, sum Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.



*„Tað er av stórum týdningi fyri tryggleika og rættin til líkaviðferð, at talgildar skipanir ikki verða settar í verk uttan umhugsni og vissu fyri heimild."*



**Hanna Vang**, Løgtingsins og barnanna umboðsmaður

# Vandi fyri mismuni í sambandi við talgilding av tænastum

Í november 2025 lat umboðsmaðurin úr hondum eitt álit um framferðina hjá Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum í sambandi við, at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í nýtslu í apríl 2025 (mál nr. 25/10570).

Í 2025 lýsti Strandfaraskip Landsins við broyting av prísbygnaði og dagføring av ferðaseðlaprísum, sum innibar, at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið skrásettu seg í skipanina og keyptu talgilt. Umboðsmaðurin metti skipanina vera ivasama, bæði viðvíkjandi heimild til at krevja talgilda luttøku og viðvíkjandi tí muni, sum skuldi gerast á ferðaseðlaprísi, um borgarar ikki nýttu talgildu loysnina.

Umboðsmaðurin valdi tí at taka mál upp av egnum ávum og viðgjørdi serliga heimildina fyri, at lægstu prísir einans vóru tøkir til tey, ið meldaðu seg í skipanina og keyptu talgilt, framferðarháttin hjá Strandfaraskipum Landsins í hesum sambandi og leiklutin hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum.

Í tveimum málum um talgilt samskifti hevur umboðsmaðurin áður mett, at myndugleikar ikki, uttan ítøkiliga lógarheimild, kunnu krevja, at borgarar melda seg í ávísa talgilda skipan (mál nr. 14/00048 og 201300055).

Í kanningini av málinum um ferðaseðlaskipanina gjørdist greitt, at neyðugt umhugsni ikki hevði verið gjørt í sambandi við fyrireiking og íverksetan av skipanini. Batar blivu tó settir í verk, tá ið umboðsmaðurin vendi sær til ráðið og vísti á veikleikarnar.

Skipanin førdi í roynd og veru við sær eina munandi príshækking fyri borgarar, sum ikki høvdu møguleika ella ynski at samskifta talgilt. Prísurin fyri at rinda á staðnum var, sambært lýsingartilfarinum, tvífalt so høgur, sum við talgildari bílegging. Henda príshækking tóktist raka øll, sum ikki keyptu talgilt, eisini borgarar, sum áðrenn broytingina høvdu rætt til niðursettan kostnað, eitt nú pensjónistar. Mátin, nýggja ferðaseðlaskipanin varð sett í verk, tóktist eftir míni meting hava eina sosiala slagsíðu. Tey, sum antin ikki høvdu førleika, ella ikki vildu nýta talgildu loysnina, fingu munandi verri sømdir, heldur enn at atlit varð tikið til teirra serliga útsettu støðu.

Umboðsmaðurin heldur, at slík umlegging til talgilda loysn, sum fór fram í sambandi við bíleggingarskipanina, eigur at vera treytað av góðari fyrireiking og umhugsni fyri, hvussu skipanin ávirkar ymsar bólkar av borgarum.

Um umlegging av tænastum til talgildar loysnir ikki verður nágreiniliga umhugsað og avleiðingagreinað, kunnu slíkar skipanir fáa sera óhepnar og eisini órættvísar fylgjur fyri summar samfelagsbólkar.
Krav um skráseting og luttøku í talgildari skipan, sum treyt fyri javnbjóðis tænastum, kann eftir meting umboðsmansins ikki setast uttan greiða heimild frá Føroya Løgtingi.

Tað er tí av stórum týdningi fyri tryggleika og rættin til líkaviðferð hjá borgarum, at talgildar skipanir, sum hava stóra ávirkan á bólkar av borgarum, ikki vera settar í verk uttan umhugsni og vissu fyri heimild.

Samanumtikið eiga myndugleikar at leggja seg eftir at veita javnbjóðis tænastur til borgarar – eisini teir, sum ikki eru førir fyri ella ynskja at samskifta talgilt. Krøv um talgilda luttøku eiga ikki at føra við sær mismun millum borgarar, uttan so at greið lógarheimild er fingin til vega fyri slíkari framferð. Um ansað ikki verður eftir hesum, tá skipanir verða settar í verk og almennar tænastur tillagaðar, er vandi fyri, at bólkar av borgarum vera fyri mismuni og ikki fáa atgongd til somu tænastur sum aðrir borgarar.


11

# 9 Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann

### 1. Partur

**Umboðsmaðurin og Løgtingið**
**§ 1**. Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.
*2. stk*. Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.
*3. stk*. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2**. Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3**. Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

### 2. Partur

**Heimildir**
**§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
*2. stk*. Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.
*3. stk*. Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.
*4. stk*. Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.
*5. stk*. Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur

**Kærumál og egin mál**
**§ 6**. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.
*2. stk*. Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.
*3. stk*. Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.
*4. stk*. Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.
*5. stk*.Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
*6. stk*. Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.
*7. stk*. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

## 4. Partur

**Kanningar**
**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina klagu til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í klaguni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
*2. stk*. Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.
*3. stk*. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.
*4. stk*. Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur

**Niðurstøður**
**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.
*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.
*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur

**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**
**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.
*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur

### Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur

### Ígildisreglur

**§ 18**. Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.
*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# 10 Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og kanningar í 2025, har álit og skriv vóru almannakunngjørd

Málini kunnu lesast á **www.lum.fo**

| Dagfesting | Málsnr. | Heiti á málinum á heimasíðuni |
|---|---|---|
| 15-01-2025 | 24/23387 | Álit um at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið ikki gav innlit í navnið á ráðgevandi persóni og í ávísar upplýsingar í umsókn um vinnuligar fiskiroyndir |
| 21-01-2025 | 24/10194 , 24/10195 | Álit um um málsviðgerðina hjá Búnaðarstovuni og Vinnumálaráðnum av eini kæru um sølu av innangarðsjørð burturav einum festi |
| 24-01-2025 | 24/22050 | Álit um málsviðgerðina hjá Sunda kommunu av einari umbøn um innlit |
| 27-01-2025 | 24/27154 | Álit um málsviðgerðina hjá Eiðis kommunu í samband við umsókn um keyp av fastogn og garðbygging |
| 17-02-2025 | 24/16558 | Álit um støðu fólkakirkjunnar innan føroysku fyrisitingina og virkisøki umboðsmansins |
| 03-03-2025 | 24/17152 | Álit um at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið staðfesti avgerð hjá Vørn um ikki at útskriva klagaranum fiskiloyvi 5A, men fiskiloyvi 5B |
| 06-03-2025 | 24/21799 | Eftirlitsvitjan á Gerðisgarði í Skálavík |
| 07-04-2025 | 24/16456, 25/00168 | Álit um skiftisregluna í sambandi við eftirløn við 60 ára aldur eftir landsstýrislønarlógini |
| 29-04-2025 | 25/07600 | Skriv til Løgmálaráðið um vantandi viðgerð av klagu um kommunuval |
| 30-04-2025 | 25/05920 | Álit um noktandi loyvi at ræna lomvigaregg |
| 14-05-2025 | 25/04771 | Álit um vantandi svar til fyrispurningar og innlitsumbøn frá Fuglafjarðar kommunu í sambandi við eitt byggimál |
| 22-05-2025 | 24/28933 | Álit um málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu av einari umbøn um innlit |
| 05-06-2025 | 25/09158 | Álit um vantandi svar frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum uppá eina umbøn um alment innlit |
| 25-06-2025 | 24/21405 | Álit um málsviðgerðina hjá barnaverndartænastuni í Tórshavnar kommunu av einum barnaverndarmáli |

| Dagfesting | Málsnr. | Heiti á málinum á heimasíðuni |
|---|---|---|
| 08-07-2025 | 25/09315 | Álit um málsviðgerðina hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum av einari umbøn um alment innlit |
| 09-07-2025 | 25/02000, 25/05230 | Álit um at Fíggjarmálaráðið lýsti broyting av linkingarhátti sambært norðurlendsku tvískattaavtaluni við kunngerð heldur enn við lóg |
| 21-08-2025 | 25/01251, 25/06200, 25/07541, 25/08634 | Álit um málsviðgerðartíð og vantandi svar frá Føroya Vanlukkutryggingarráð og Arbeiðs- og brunaeftirlitinum í sambandi við arbeiðsskaðamál |
| 03-09-2025 | 24/26860 | Álit um um framferðarháttin hjá Taks í sambandi við skatta-broytingar av pensjónsveitingum til Stóra Bretlands eftir Brexit |
| 15-09-2025 | 25/13894 | Álit um handfaringina hjá Sumbiar kommunu av fráboðanum um leysan seyð í bygdini eftir 15. mai |
| 29-09-2025 | 24/27382 | Álit um handfaringina hjá Landsverk av eini umbøn um innlit |
| 14-11-2025 | 25/10570 | Álit um framferðina hjá Strandfaraskipum Landsins og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum í sambandi við at nýggj ferðaseðlaskipan varð tikin í nýtslu í apríl 2025 |
| 24-11-2025 | 25/07621 | Eftirlitsvitjan á Skúlanum á Trøðni |

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR, UNDIR BRYGGJUBAKKA 11, POSTMOGA 2008, FO-110 TÓRSHAVN